# GERÐABÓK

**Dato:** 29. oktober 2015 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 175/15-203/15**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrun Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Mikael H. Viderø
Eyðna Justinussen
Høgni Reistrup

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingunn Eiriksdóttir

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 175/15 | 15/04136-1 | Mál beind í nevndir | 12479 |
| 176/15 | 15/00579-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2015 | 12480 |
| 177/15 | 15/03473-2 | Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2014 hjá Westward Ho | 12482 |
| 178/15 | 15/01778-1 | Framflyting og meirjáttan íløgur Tórshavnar havn 2015 | 12483 |
| 179/15 | 15/02148-1 | Fíggjarætlan 2016 | 12484 |
| 180/15 | 14/00896-7 | Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki | 12490 |
| 181/15 | 14/02134-13 | Stuðul til felagshús á Argjum | 12498 |
| 182/15 | 15/03756-1 | Nýskapanarhúsið Hugskotið | 12503 |
| 183/15 | 14/04321-18 | Arnstein Niclasen : Umsókn vegna Ebenezer at endurnýggja leigusáttmálan til Sloans hús (2009-2383) | 12505 |
| 184/15 | 15/00969-1 | Útstykking á Hamrabø matr. nr. 91a, Kollafirði | 12506 |
| 185/15 | 15/00833-1 | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri víðkan av Skansabryggjuni og eystara havnaøki | 12508 |
| 186/15 | 14/04429-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini í sambandi við víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki | 12512 |
| 187/15 | 15/03675-1 | Uppskot til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn | 12514 |
| 188/15 | 15/01720-1 | Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri B6 vinnuøkið Yviri við Strond | 12516 |
| 189/15 | 14/00767-1 | Broyting av ferðaætlanini í sambandi við koyring til Boðanesheimið | 12519 |
| 190/15 | 15/03724-1 | Beinkirnir í Steinatúni, tiknir burtur í summarfrítíðini | 12522 |
| 191/15 | 14/00410-4 | Sp/f Carl Aug.Jensen, matr. nr.: 149a, Kollafjørð : Ynskir at almenna WC í Kollafirði verður beint burtur ella flutt (2013-2233) | 12523 |
| 192/15 | 14/02182-8 | Áheitan frá borgara um at gera vegastrekkið við Dalalíð liðugt (2011-2060) | 12525 |
| 193/15 | 15/03449-4 | P/F Guttesen & Staksberg : Umsókn um at kommunan yvirtekur vegin Maritugøtu, matr. nr. 1øi, Hoyvík | 12527 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 194/15 | 15/03515-2 | Yvirtøka av vegøki matr. nr. 1180n, Tórshavn, vegamóti í Svanga – Grønlandsvegur. | 12528 |
| 195/15 | 15/03520-2 | Yvirtøka av vegnum Heinagøta, matr. nr. 1413m og 1412ab, Tórshavn | 12529 |
| 196/15 | 15/03533-2 | Yvirtøka av vegøki matr. nr. 683aq, Tórshavn, síðugøta við vegamótið Skúlagøta-Stoffalág | 12530 |
| 197/15 | 15/03585-2 | Sp/f Matrikul 1228a søkir um at kommunan yvirtekur vegøki á Hjaltarók, matr. nr. 1227a, Tórshavn | 12531 |
| 198/15 | 14/01792-35 | Útleiðingar út á Sjógv frá Sandvíkarhjalla og Yviri við Strond (Eystfalssker-Válgaravík-Kommandørhúsunum) (2013-0562) | 12532 |
| 199/15 | 14/01625-1 | Møguligt samstarv við IRF um viðgerð og burturbeining av rottangaevju | 12535 |
| 200/15 | 14/02031-19 | Kloakk við Hoyvík/Hoydalar (2013-0563) | 12542 |
| 201/15 | 15/03637-1 | Kloakk á Signabø | 12544 |
| 202/15 | 15/03745-1 | Dagføring av kloakk í Líðunum | 12545 |
| 203/15 | 15/03746-1 | Dagføring av kloakk við Tjarnarlág | 12546 |

Býráðsformaðurin setti fundin og las gerðabókina.

## ***175/15 Mál beind í nevndir***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 175/15 | 15/04136-1 |

**Málslýsing:** Framlagt.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tikið til eftirtektar.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>29. oktober 2015 | Blað nr.: 12480<br><br>Formansins merki: |

# 176/15 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2015 | 47/15 | 15/00579-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 261/15 | 15/00579-1 |
| 11 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 176/15 | 15/00579-1 |
| 2 Býráðsfundir | 26.02.2015 | 22/15 | 15/00579-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.03.2015 | 85/15 | 15/00579-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 88/15 | 15/00579-1 |
| 5 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 65/15 | 15/00579-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 170/15 | 15/00579-1 |
| 7 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 113/15 | 15/00579-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 187/15 | 15/00579-1 |
| 9 Býráðsfundir | 30.09.2015 | 145/15 | 15/00579-1 |

**Málslýsing**:
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Góðkent.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 25. mars 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Roknskapurin fyri mai, juni, juli og august framlagdur og góðkendur.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen og Sjúrður Olsen luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt góðkent.

# 177/15 Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2014 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 260/15 | 15/03473-2 |
| 2 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 177/15 | 15/03473-2 |

**Málslýsing:**
Roknskapurin fyri 2014 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2014 verður framlagur.

**Nevndarfundur 14. september 2015:** Góðkendur og samtykt at mæla fíggjarnevndini til at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna roknskapin.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt góðkent.

## 178/15 Framflyting og meirjáttan íløgur Tórshavnar havn 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.06.2015 | 19/15 | 15/01778-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 144/15 | 15/01778-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 114/15 | 15/01778-1 |
| 4 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 178/15 | 15/01778-1 |

**Málslýsing**:
Samlaði íløgukarmurin fyri Tórshavnar havn í 2015 er 60 mió.
Tað eru fleiri íløgur, sum eru játtaðar í 2013 og 2014, har arbeiðið ikki er liðugt, og koma tí at fara av íløgukarminum fyri 2015.
Íløgur játtaðar í 2013, 2014 og 2015, og sum helst verða útførdar í 2015 eru upp á tilsamans kr. 76.655.455.

| **Projekt** | **Játtan** | **Brúkt áðrenn 2015** | **Íløgur 2015** | **Samlað játtan** |
|---|---|---|---|---|
| Íløgukarmur fíggjarætl 2015 | | | | 60.000.000 |
| Sjóvinnuhúsið | 73.900.000 | 15.578.399 | 58.321.601 | |
| Omankoyring vest bryggja | 2.909.198 | 1.840.972 | 1.068.226 | |
| Fyrireiking Skansabryggjan | 4.000.000 | 2.436.953 | 838.158 | |
| Projektering Skansabryggjan | 6.000.000 | | 6.000.000 | |
| Meirkostnaður Sjóvinnuhúsið | 10.427.470 | | 10.427.470 | |
| Framflutt ikki brúkt játtan 2014 | | | | **1.275.000** |
| | | | **76.655.455** | **61.275.000** |

Meir játtan íløgur 2015 er munurin á kr. 76.655.455 og kr. 61.275.000, sum er **kr. 15.380.455**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at flyta t.kr 1.275 til íløgur 2015, og at hækka íløgukarmin fyri 2015 við kr. 15.380.455.

**Vinnunevndin 01. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 179/15 Fíggjarætlan 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.08.2015 | 166/15 | 15/02148-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.10.2015 | 52/15 | 15/02148-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 210/15 | 15/02148-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 194/15 | 15/02148-1 |
| 13 Tekniska nevnd | 22.10.2015 | 113/15 | 15/02148-1 |
| 14 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 179/15 | 15/02148-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 29.10.2015 | 267/15 | 15/02148-1 |
| 16 Vinnunevndin | 02.11.2015 | 41/15 | 15/02148-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 02.09.2015 | 73/15 | 15/02148-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.09.2015 | 41/15 | 15/02148-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 03.09.2015 | 184/15 | 15/02148-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 04.09.2015 | 28/15 | 15/02148-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 188/15 | 15/02148-1 |
| 7 Býráðsfundir | 30.09.2015 | 143/15 | 15/02148-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 05.10.2015 | 31/15 | 15/02148-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 186/15 | 15/02148-1 |

**Málslýsing:**
**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Framlagt.

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. august 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Sambært leistinum fyri gerð av fíggjarætlan, samtykt í fíggjarnevndini 25. mars 2015, skal fíggjarætlanaruppskot leggjast fyri faknevndirnar sum grundarlag fyri víðari viðgerð. Fíggjarætlan fyri partar av greinunum 6 og 7 verður umrødd yvirskipað, eins og møguligar virksemisbroytingar og raðfestingar.

**Tekniska nevnd 02. september 2015:** Tekniski stjórin kunnaði um virkisøkið hjá teknisku deild.

**Ískoyti:**
Sambært leistinum fyri gerð av fíggjarætlan, samtykt í fíggjarnevndini 25. mars 2015, skal fíggjarætlanaruppskot leggjast fyri faknevndirnar sum grundarlag fyri víðari viðgerð. Fíggjarætlan fyri partar av grein 6 verður umrødd yvirskipað, eins og møguligar virksemisbroytingar og raðfestingar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. september 2015:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Sambært leistinum fyri gerð av fíggjarætlan, samtykt í fíggjarnevndini 25. mars 2015, skal fíggjarætlanaruppskot leggjast fyri faknevndirnar sum grundarlag fyri víðari viðgerð.

Fíggjarætlan fyri greinirnar 3, 4 og 5 verður umrødd yvirskipað, eins og møguligar virksemisbroytingar og raðfestingar.

**Mentamálanevndin 3. september 2015:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Fíggjarætlan fyri grein 2 verður umrødd yvirskipað, eins og møguligar virksemisbroytingar og raðfestingar.

**Trivnaðarnevndin 4. september 2015:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember 2014.

Arbeitt er við uppskotinum til fíggjarætlan 2016 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fyritreytirnar fyri uppskotinum er at skattaprosenti lækkar frá 20,25 til 19,75 og at barnafrádrátturin framhaldandi verður 8.000 kr. Hædd er tikið fyri lønarvøkstri og virksemisbroytingum annars. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt upp á greinar, tølini eru undantikið Tórshavnar Havn.

| **Uppskot til fíggjarætlan 2016** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **t.kr.** | **FÆ2015** | **FÆ2016** | **Broyting pct.** | **Broyting kr.** |
| §1 Kommunal fyrisiting | 75.668 | 79.019 | 4,4% | 3.351 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 192.135 | 194.468 | 1,2% | 2.333 |
| §3 Børn og ung | 138.272 | 147.038 | 6,3% | 8.766 |
| §4 Undirvísing | 37.157 | 38.167 | 2,7% | 1.010 |
| §5 Mentan og frítíð | 44.343 | 45.996 | 3,7% | 1.653 |
| §6 Teknisk mál | 108.877 | 110.521 | 1,5% | 1.644 |
| §7 Kommunal virkir | 55.517 | 57.054 | 2,8% | 1.537 |
| **Útreiðslur íalt** | **651.969** | **672.263** | **3,1%** | **20.294** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur** | **773.593** | **804.537** | **4,0%** | **30.944** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir** | **121.624** | **132.274** | **8,8%** | **10.650** |

Í uppskotinum til fíggjarætlan hækka rakstrarútreiðslurnar 3,1% úr 652 til 672 mió. kr. Størsta hækkingin 6,3% er innan barnaansingarøkið, játtanin fylgir barnatalinum. Kommunal fyrisiting hækkar við 4,4%. Orsøkin til vøksturin er býráðsval í 2016 og ein økt játtan til kunningartøkni. §5 Mentan og frítíð hækkar við 3,7% høvuðsorsøkirnar er ein økt játtan til Tórshavnar Musikkskúla, Býarbókasavnið og svimjihøllina.

Samlaðu inntøkurnar vaksa við 4% úr 774 mió. kr. til 805 mió. kr. ella 30 mió. kr.í mun til fíggjarætlan 2015. Kommunuskatturin hækkar 4,73% í mun til fíggjarætlan 2015. Í mun til framrokning frá TAKS 31.08.2015 er løgd ein hækking inn á 2%.

Við hesum fyritreytum er úrslit áðrenn íløgur og avdráttir góðar 132 mió. kr. fyri Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur støðu til uppskotið at leggja fyri býráðið.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 5. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við fíggjarætlanar uppskotinum, tó við hesum viðmerkingum: at rakstrarjáttan kr. 425.000 verður fingin til vega til Lopfjølina (14/01951), og at íløgujáttan kr. 5 mió verður sett av til staðseting og at seta verkætlanarbólk at fyrireika bygging av íbúðardepli til eldri við atknýttari heimatænastu.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Samtykt at taka málið upp aftur á næsta fundi.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við fíggjarætlanar uppskotinum, tó við hesum viðmerkingum: at avsettar verða 2,5 mió. kr. til átrokandi viðlíkahald av bygningum hjá brennistøðini, og at avseta 450.000 kr. til gerð av umhvørvispolitikki.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við fíggjarætlanar uppskotinum tó við hesum viðmerkingum: at rakstrarjáttan kr. 500.000 verður fingin til vega til ungdómsklubbar í kommununi (grein 3), at rakstrarjáttan kr. 1.500.000 verður fingin til vega til útiøkið hjá skúlum (grein 4), og at rakstrarjáttan í alt kr. 550.000 verður fingin til vega til ávikavist KODA-gjøld og netorðabøkur Sprotans (grein 5).

Ein minniluti, Halla Samuelsen, mælir harumframt til at játta kr. 1.000.000 til at fyrireika Squash-høll.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við fíggjarætlanar uppskotinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 22. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við fíggjarætlanar uppskotinum fyri rakstrinum, ið nevndin varar av. Nevndin vísir á, at tørvur er á íløgum innan hesi øki:

Samtykt at taka undir við fíggjarætlanar uppskotinum fyri raksturin, ið nevndin varar av.
Nevndin vísir á, at tørvur er á íløgum innan hesi øki:

- Kloakkir
- Veggagerð til LSH H-bygningin
- Vegagerð í sambandi við skúlabyggingar í Marknagili
- Asfaltering av Klingruni ísv. útstykkingina oman Gil
- Breiðkan av Sundsvegnum (millum rundkoyringarnar)
- Manningarhøll til vegadeildina í grótbrotinum
- Bakkaverja í Kirkjubø
- Vegur til utst. Undir Kongavarða

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at taka støðu til fyriliggjandi fíggjarætlan og nevndarbroytingar sambært niðanfyristandandi:

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | **2016** |
|---|---|---|---|
| | Rakstrarætlan | | Løgu- |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | ætlan |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **79.019** | **-** | **-** |
| 11. Felagsútreiðslur | 76.019 | - | - |
| 18. Almenn starvsfólk v.m. | 3.000 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **194.467** | **-** | **-** |
| 20. Heilsumál | 18.105 | - | - |
| 21. Almannamál | 176.362 | - | - |
| **§ 3. Børn og ung** | **147.038** | **-** | **8.750** |
| 24. Mentan | 6.968 | - | - |
| 26. Barnaansing | 140.070 | - | 8.750 |
| **§ 4. Undirvísing** | **38.168** | **-** | **23.000** |
| 23. Útbúgving og gransking | 38.168 | - | 23.000 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **45.997** | **-** | **46.000** |
| 23. Útbúgving og gransking | 11.326 | - | 15.000 |
| 24. Mentan | 34.671 | - | 31.000 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **110.520** | **-** | **56.300** |
| 11. Felagsútreiðslur | 47.553 | - | 9.000 |
| 24. Mentan | 2.871 | - | 4.000 |
| 30. Umhvørvi | 18.268 | - | 16.800 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 41.828 | - | 26.500 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **25.584** | **-** | **205.000** |
| 30. Umhvørvi | 19.125 | - | 5.000 |
| 31. Tilbúgving | 8.574 | - | - |
| 37. Handil og vinna annars | 4.826 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | -6.941 | - | 200.000 |
| **Tilsamans** | **640.793** | **-** | **339.050** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 21.000 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 8.869 | 300 | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | 2.000 | 836.106 | - |
| Tilsamans | 672.662 | 836.406 | 339.050 |
| **Yvirskot** | **-** | **163.744** | **-** |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **-175.306** | **-** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 16.307 | - | **-** |
| **Bruttokassaúrslit** | **16.307** | **-175.306** | **-191.613** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 191.613 | **-** |
| Fígging íalt: | - | 191.613 | 191.613 |
| **Samanlagt** | **16.307** | **16.307** | **-** |

## Uppskot til broytingar frá nevndunum:

| | Rakstur | Íløgur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| **Trivnaðarnevndin** | | | |
| Lopfjølin | 425.000 | | 425.000 |
| Íbúðardepil til eldri | | 5.000.000 | 5.000.000 |
| | | | |
| **Náttúru- og umhvørvisnevndin** | | | |
| Ger av umhvørvispolitikki | 450.000 | | 450.000 |
| Viðlíkahald av bygninginum hjá brennistøðini | 2.500.000 | | 2.500.000 |
| | | | |
| **Mentamálanevndin** | | | |
| Rakstrar játtan til ungdómsklubbar §3 | 500.000 | | 500.000 |
| Rakstrar játtan útiøki hjá skúlunum §4 | 1.500.000 | | 1.500.000 |
| Rakstrarjáttan KODA-gjøld og netorðabøkur Sprotans §5 | 550.000 | | 550.000 |
| | | | |
| **Tekniska nevnd** | | | |
| Kloakkir | | ? | |
| Vegagerð til LS H-bygningur | | ? | |
| Vegagerð í sambandi við skúlabyggningar í Marknagili | | ? | |
| Asfaltering av Klingruni ísv. Útstykkingina oman Gil | | ? | |
| Breiðkan av Sundsvegnum (millum rundkoyringar) | | ? | |
| Manningarhøll til vegadeildina í grótbrotinum | | ? | |
| Bakkaverja í Kirkjubø | | ? | |
| Vegur til útst. Undir Kongavarða | | ? | |
| | | ? | |
| **Broyting tilsamans** | **5.925.000** | **5.000.000** | **10.925.000** |

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein mælir býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við teirri broyting, at konto 8375 lækkar við kr. 4 mió. Viðvíkjandi teimum broytingum, ið nevndirnar hava mælt til, verða hesar beindar aftur í nevndirnar við atliti til at finna fígging innanfyri samlaða karmin í uppskotinum til fíggjarætlan.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi, men mælir til at geva uppskotunum frá nevndunum gætir.

Tikið verður til eftirtektar, at nýggj inntøkumeting er gjørd, ið vísir hækkaðar inntøkur á kr. 4,8 mió. kr., ið stavar frá afturberingini fyri eldraøkið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen.

Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam greiddu ikki atkvøðu.

# 180/15 Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.06.2014 | 28/14 | 14/00896-7 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.04.2015 | 35/15 | 14/00896-7 |
| 11 Vinnunevndin | 18.05.2015 | 12/15 | 14/00896-7 |
| 12 Vinnunevndin | 24.09.2015 | 29/15 | 14/00896-7 |
| 13 Vinnunevndin | 12.10.2015 | 36/15 | 14/00896-7 |
| 14 Vinnunevndin | 14.10.2015 | 37/15 | 14/00896-7 |
| 15 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 249/15 | 14/00896-7 |
| 16 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 180/15 | 14/00896-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 166/14 | 14/00896-7 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 139/14 | 14/00896-7 |
| 4 Vinnunevndin | 12.01.2015 | 3/15 | 14/00896-7 |
| 5 Vinnunevndin | 20.01.2015 | 4/15 | 14/00896-7 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.01.2015 | 24/15 | 14/00896-7 |
| 7 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 18/15 | 14/00896-7 |
| 8 Vinnunevndin | 20.04.2015 | 11/15 | 14/00896-7 |
| 9 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 72/15 | 14/00896-7 |

## Málslýsing:

**Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki.**
Seinasta stóra havnaútbyggingin í Tórshavn, var liðug í 1997, tá tann uttasti parturin av molanum varð breiðkaður. Hendan útbyggingin bleiv gjørd í tøkum tíma, tí bingjuflutningurin er støðugt vaksin síðani.

Síðani útbyggingina í Tórshavn í 1997, er havnarlagið í Kollafirði munandi útbygt. Útbyggingarnar í Kollafirði og á Oyrareingjum hava skapt nógv virksemi. Tørvurin á størri útbyggingum er ikki akuttur í løtuni, men hann kann vísa seg seinni.

Undantikið tað, sum verður uppskipað á Oyrareingjum, kemur allur innflutningur til Føroyar, sum kemur við bingjum og trailarum, um bryggjuna í Tórshavn. At bingjuhavnin liggur í Tórshavn ger, at flutningurin til nógv tann størsta partin av forbrúkarunum er stuttur.

Verðandi umstøður á Eystaru bryggju eru langt frá optimalar, tí:

- **Dýpið fram við Eystara mola og innsiglingin er ov lítið**. Hetta viðførir at tá verðandi bingjuskip liggja við bryggju, er neyðugt at leggja fendarar millum skipið og bryggjuna. Hetta er ikki nøktandi, og ger tað ómøguligt at fáa størri bingjuskip til bryggju, enn tey verðandi.
Alt fleiri ferðamannaskip, sum sigla á okkara leiðum, kunnu ikki koma til bryggju, tí dýpið er ov lítið.
- **Kajplássið, serliga um summarið, er sera avmarkað.** Hetta merkir at vit ikki kunnu avgreiða ferðamannaskipini og bingjuskipini samstundis, og tað er ómøgulig at vaksa um møguligt annað virksemi.
- **Økið til bingjur og trailarar er ov lítið.** At økið til bingjur og trailarar er ov lítið, viðførir at arbeiðsgongdin ikki er nøktandi og tað blíva alt ov nógvar flytingar.
- **Økið til pakkhús o.a. er ov lítið.** Fyri ikki at minka um verðandi bingjuøki, ber ikki til at byggja goymslubygningar o.a. sum tørvur er á til havnavirksemið.

- **Økið til avgreiðslu av ferðafólki og bilum er ov lítið.** Tað er ov lítið pláss at avgreiða ferðafólk og bilar, serliga um summarið. Ein víðkan av havnaøkinum, hevði gjørt tað møguligt at umskipa økið rundan um farstøðina, soleiðis at betri pláss var til tey ferðandi.

Einasti møguleiki at betra munandi um umstøðurnar á Eystaru bryggu í Tórshavn, er at leingja molan á Skansabryggjuni, og at víðka verðandi øki suðureftir og eystureftir.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at býráðið velur 2 býráðslimir í bygginevndina
- at bygginevndin ger byggiprogram.
- beinanvegin at seta í verk árinskanning, hydrauliskar kanningar og at fáa til vega neyðug loyvir.
- at kanningar og fyrireikingar, upp til 3 mió. verða goldnar av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 30. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 30. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við einari atkvøðu fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at velja Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurdsson í bygginevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

**Bygginevndin hevur havt 10 fundir, og hevur hesar viðmerkingar:**

**Grótbrot:** Grótið til uppfyllingina, sum er umleið 80.000 $m^2$ verður tikið á sama stað sum til seinastu havnaútbyggingina, við at víðka verðandi grótbrot á Glyvursnesi suðureftir.
Yvirfriðingarnevndin hevur góðkent, at grótbrotið verður víðkað.

Avtala um gróttøku er ikki gjørd við Búnaðarstovuna enn.

**Aldusimuleringar:** DHI hevur gjørt aldusimuleringar av, hvussu kyrt tað verður í tí nýggju- og verðandi havnini , tá útbyggingin er liðug. Kanningarnar vísa, at kyrran í tí nýggju havnini verður umleið tann sama, sum tað er í verðandi havn í dag. Kanningin vísir eisini, at aftan á ýtbyggingina, verður tað munandi kyrrari í verðandi havn.
Útbyggingin hevur eisini ein positiva ávirkan á Álaker og Argir, serliga á landnyrðingi.

**Grótkast:** Fyri at kunna taka støðu til hvussu sjálvt grótkastið skal byggjast , eru ávegis kanningar gjørdar hjá DHI.
Ávegis kanningarnar vísa, at tann norðari parturin av grótkastinum skal vera nakað hægri enn verðandi moli.
Fyri at fáa endaliga staðfest, hvussu uppbyggingin av molanum skal verða, er neyðugt at gera eina modelroynd, sum verður liðug í september 2014.

**Sandagerð:** Kanningar vísa, at útbyggingin ikki hevur nevniverduga ávirkan á sandin í Sandágerði.

**Havnalagið:** Fyri at fáa skapið á havnalagnum at hóska so væl til landslagið sum til ber, er nógv orka, saman við arkitekti, brúkt upp á at fáa tað rætta skapið.
Uppskotið er ein samlað víðkan av havnalagnum upp á umleið 163.000 $m^2$, við einari atløgusíðu upp á umleið 700 m

**Skansin:** Fyri at fáa eina so góða loysn sum til ber, hevur verið samskift við Fornminnisnevndina.
Tað hevur verið týdningarmikið, at umhvørvið rundan um Skansan, aftan á útbyggingina, skal verða eitt trivnaðarøki.
Nýggja havnalagið er umleið 50 m leyst av fjøruni undir Skansanum, har møguleiki er at leggja smábátar.

**Friðingarmyndugleikar:** Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 10. juni 2014 samtykt at geva loyvi til útbyggingina.

**Árinskanning:** Tá bygt verður so út á sjógv, er neyðugt at gera eina árinskanning. Hetta er ein umfatandi kanning, sum lýsir hvørja ávirkan útbyggingin hevur á umhvørvið.
Rambøl hevur gjørt kanningina, sum aftaná at býráðið hevur samtykt tað, verður send til umhvørvisstovuna.
Tað er Umhvørvisstovan sum endaliga góðkennir ætlanina.

**Broyting av byggisamtykt:** Neyðugt verður at víðka verðandi byggisamtykt til eisini at fevna um nýggja havnalagið. Uppskot um hetta, eigur sum skjótast at verða lagt fyri nevnd.

**Framhaldandi fyrireiking:** Fyri at kunna gera tær endaligu fyrireikingarnar áðrenn støða verður tikin til at projektera, er neyðugt at gera modelroynd av nýggja molanum.
Eisini er neyðugt at gera byggiprogram.

Tað eru áður jattaðar 3 mió til fyrireikingar. Neyðugt er at játta 1 mió. afturat, soleiðis at møguligt er gera modelroyndina og byggiprogrammið.
Hetta arbeiðið eigur at verða liðugt í oktober.

**Tilmæli:**

Havnameistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja, at VVM kanningin verður send til Umhvørvisstovuna til góðkenningar, tá hon er liðug.

Mælt verður eisini til at játta 1 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn til fyrireiking og ger av byggiprogrammi.

**Vinnunevndin 16. juni 2014:** Samtykt taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø og Sigrún Mohr,

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
**Støðulýsing**
**Árinskanningin,** hevur verið til hoyring. Viðmerkingar til hoyringsskrivini verða í løtuni viðgjørd. Tá viðgerðin er liðug, verður hon løgd fyri býráðið, og eftirfylgjandi send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Modelroyndin,** sum vísir hvussu grótkastið skal uppbyggjast er liðug.

**Byggiprogrammið** er gjørt.

Um arbeiðið skal kunna bjóðast út í 2015, má projekteringin byrja nú. Uppskot til avtalu um projektering er gjørt við LBF, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja uppskot til byggiprogram.

Eisini verður mælt til at játta 6 mió. kr. til projektering og forkanningar.

**Vinnunevndin 12. januar 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 20. januar 2015:** Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at samtykkja, at aðrir møguleikar fyri víðkaðari góðshavn í kommununi verða gjølla kannaðir við atliti at kostnaði og umstøðum annars, áðrenn byggiskrá verður samtykt og peningur játtaður til at projektera ætlaðu útbygginina av Skansabryggjuni og Eystara havnarøki í Havn. Víst verður til framløgd skitsuuppskot d.d. um havnarbygging á Sundi.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Árinskanningin lá frammi til hoyringar í tíðarskeiðinum frá 26. juni til 19. september 2014, og inn komu 7 hoyringsskriv.
Ein samlað viðmerking til hoyringsskrivini er gjørd í ”hvidbog”, sum saman við árinskanningini verður send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við viðmerkingunum í ”hvidbog” og at senda hesar til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Vinnunevndin 20. april 2015:** Ein meiriluti **:** Sjúrður Olsen, tróndur Sigurðsson, og Annfinn Brekksteintekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men vísir til minnilutatilmælið frá vinnunevndini 20. januar 2015.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við vinnunevndini og at senda málið í náttúru- og umhvørvisnevndina, áðrenn málið verður sent Umhvørvisstovuni, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Uppskot til serstaka byggisamtykt er gjørd fyri økið (okkara j.nr. 15/00833), og liggur uppskotið alment frammi í 6 vikur til fyrst í juni, síðani skulu møguligar innkomnar viðmerkingar viðgerast.
Uppskotið til byggisamtykt liggur á heimasíðuni hjá kommununi.

Skjøl:
14/03771-13 VVM umhvørvisárinsmeting
14/03771-14 Samandráttur av VVM umhvørvisárinsmeting
14/03771-6 Kort yvir kloakkir
14/03771-9 Viðmerkingar frá náttúru- og umhvørvisdeildini
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. apríl 2015:** Málið umrøtt.

**Vinnunevndin 18. mai 2015:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi tann 29. januar 2015, at játta pening til projektering.
Forprojekt er gjørt.

Fyri at kunna taka avgerð um, hvørjir arbeiðstakarar hava førleika at gera arbeiðið, er fragast at hava eina undangóðkenning.
Tað tekur tíð at hava eina undangóðkenning.

Í tilfarinum til undangóðkenning eigur at verða kunnað um, hvussu stóran prosentpart av kostnaðinum arbeiðstakarin skal seta sum bankatrygd. Í ABF er ásett, at arbeiðstakarin skal seta eina trygd upp á 15%.
Tað er ikki óvanligt í okkara grannalondum, at trygdin er 10% og minni. Ein annar leistur er, at trygdin verður ásett til 10% og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.Um krav um trygd er ov høgt, kann tað blíva trupult hjá føroyskum arbeiðstakarum at bjóða.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum og bygginevndini:**
Mælt verður til:
- at góðkenna forprojektið.
- at lýsa til almenna undangóðkenning.
- at arbeiðstakarin skal seta ein bankatrygd upp á 10% av sáttmálaupphæddini og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.

**Vinnunevndin 24. september 2015:**
Eini meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 24. september 2015:**
Eini meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur nú í longri tíð verið í Yvirfriðingarnevndini og Býarskipanarnevnd Landsins, uttan at nøkur avgerð verður tikin. Orsøkin til hetta tykist fyrst og fremst at vera árinið ætlanin hevur á útsýnið frá Skansanum.

Fyri at fáa gongd á málið er politisk avgerð tikin um, at minka ætlanina.

Tann broytta ætlanin førir við sær, at útfyllingin frammanfyri Skansan verður tikin burtur og økið minkar við 70.000 $m^2$.

Broytta ætlanin ger, at øll ferðslan til havnarøkið verður leidd eftir verðandi til- og frákoyring.

Broytingin viðførir eisini, at økið til pakkhús og avgreiðslu minkar munandi. Fyri at bøta um hetta, ber til at vaksa útbyggingina vestureftir við 15.000 $m^2$.

Broytta ætlanin og óvantaðar kanniningar av botninum gera, at neyðugt er at játta 1 mió. kr afturat til projektering.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at tillaga projektið sambært nýggju ætlanini, og at játta 1 mió. afturat til projektering.

**Vinnunevndin 12. oktober 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 14. oktober 2015:**

Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen, taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Minnilutin ásannar, at nýggja ætlanin er øðrvísi enn tann fyrra, men so leingi Yvirfriðingarnevndin ikki hevur tikið støðu til loyvið til nýggju ætlaninina, mælir minnilutin frá at játta fleiri pengar til at projektera ætlaðu havnaútbyggingina.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Tjóðveldi, ið fall við trimum atkvøðum fyri og 9 ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og trimum ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

# 181/15 Stuðul til felagshús á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 64/14 | 14/02134-13 |
| 10 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 154/15 | 14/02134-13 |
| 11 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 131/15 | 14/02134-13 |
| 12 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 181/15 | 14/02134-13 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.05.2014 | 110/14 | 14/02134-13 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 102/14 | 14/02134-13 |
| 4 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 140/14 | 14/02134-13 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.03.2015 | 77/15 | 14/02134-13 |
| 6 Mentamálanevndin | 18.03.2015 | 58/15 | 14/02134-13 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.06.2015 | 183/15 | 14/02134-13 |
| 8 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 143/15 | 14/02134-13 |
| 9 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 166/15 | 14/02134-13 |

## Málslýsing:
Argja Bóltfelag arbeiðir við ætlanum um at innrætta hæddina undir áskoðaraplássunum í AB-skýlinum, har gerast skulu umklæðingarrúm, goymslurúm og felagshøli. Í hesum sambandi hevur Argja Bóltfelag søkt um stuðul frá Fótbóltssambandi Føroya, og í skrivi, dagfest 13. desember 2012, varð boðað frá, at Fótbóltssambandið stuðlar AB við kr. 600.000 til nýtt felagshús á Argjum.

Síðani vendi Argja Bóltfelag sær til Tórshavnar kommunu um stuðul til arbeiðið. Tórshavnar kommuna hevur fingið kostnaðarmeting og tekningar frá Argja Bóltfelag, og samlaði kostnaðurin verður sambært kostnaðarmetingini kr. 8.264.239,50, íroknað 25% mvg.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at viðgera málið saman við íløguætlanini 2014.

**Ískoyti:**
Argja Bóltfelag heitir á kommununa um at fáa stuðul til at gera partar av arbeiðinum at innrætta skýlið til tess ikki at missa stuðulin frá FSF kr. 600.000.

Felagið hevur fingið tilboð uppá planering, stoypa gólv, múra rest av útveggum til almenn wc og goymslu/fýrrúm í báðum endunum, allar hurðar og øll vindeygu, øll innandura kloak- og frárensluviðurskifti og hitarør, og lutvíst rør til heitt og alt vatn. Tilboðið er kr. 1.178.530 u/mvg. Arbeiðið er mett at vera liðugt síðst í januar 2014.

Felagið bjóðar sær standa fyri arbeiðinum og søkir um kr. 600.000 í stuðli.

Tá hetta arbeiðið er gjørt, verður næsta stig liðugtgerð av báðum endunum, herundir at gera almennu wc-ini, hitaverk og rottanga. Eftir tað kunnu umklæðingarrúm v.m. gerast so hvørt fíggingin er tøk.

Treyt fyri stuðli er, at kommunan fær endaligan byggiroknskap til góðkenningar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 600.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 27. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 600.000 í stuðli av konto 5370 Stuðul til íløgur og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt góðkent, at Sjúrður Olsen fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at stoypa, planera v.m. sum omanfyri lýst er gjørt. Harumframt hevur kommunan grivið nýggja leiðingsgrøv til kloakk, vatn, el, fipur v.m. umframt annað lendisarbeiði fyri kr. 660.000, sum ætlanin hevur verið skal býtast javnt millum íløgujáttan til AB-skýlið og rakstrarkontu á teknisku fyrisiting.

AB søkir nú um at halda fram við arbeiðinum við at innrætta sjálvan bygningin, samlað kostnaðarmeting við innheintaðum tilboðsprísum er kr. 5,4 mió u/mvg. Talan er um fýra umklæðingarrúm, dómararúm, almenn wc v.m. og felagshøli. Partur av útreiðslunum er til innbúgv o.a. uml. kr. 200.000. Upplýst er kommununi, at AB hevur søkt FSF um stuðul til liðugtgerð av skýlinum.

Á íløguætlanini fyri 2014 er játtan kr. 4,2 mió tøk til ítróttarøkið á Argjum. Helvtin av teim áðurnevndu kr. 660.000 ætlast fíggjað av hesi játtan, eftir eru sostatt kr. 3.870.000, sum íroknað kommunalt mvg er 67% av tilboðskostnaðinum.

Skal AB standa fyri arbeiðinum, er neyðugt at fáa upplýst, hvussu felagið ætlar at fíggja írestandi upphæddina kr. 1,5 mió. Umframt stuðul frá FSF, hevur felagið lagt upp til fígging við sjálvbodnum arbeiði.

Treytir:
Kommunan skal tí seta sum treyt fyri fígging ella stuðli, at talan er um endaligan stuðul til bygginginga, at felagið upplýsir, hvussu írestandi upphæddin verður fingin til vega, og at øll neyðug byggiloyvi og myndugleikaloyvi annars eru fingin til vega, áðrenn byggingin byrjar.

Eisini verður at seta sum treyt, at umboð fyri kommununa tekur lut á øllum projektfundum, og at stuðul verður goldin út à conto eftir umbøn fyri gjørt og váttað arbeiði. Harumframt er krav, at stuðul verður fluttur bert um serstaka byggikontu uttanfyri raksturin hjá felagnum annars, og at endaligur byggiroknskapur verður latin kommununa at góðkenna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til

- at játta kr. 3.870.000 til at innrætta hølini undir AB-skýlinum og kr. 330.000 til gjørt leiðingsarbeiði, sum tekniska fyrisiting hevur staðið fyri, í alt kr. 4,2 mió av íløgukontu 5775 ítróttaranlegg, og
- at AB stendur fyri at fremja arbeiðið at innrætta hølini eftir omanfyri nevndu treytum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 1. mai 2014**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein; Bjørghild Djurhuus; Bogi Andreasen; Elin Lindenskov; Halla Samuelsen; Heðin Mortensen; Helena Dam á Neystabø; Jákup Dam; Jógvan Arge; Sigrun Mohr; Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurðsson hava Játtað at samtykkja málið við aðru viðgerð. Marin Katrina Frýdal hevði ikki svarað tá freistin var farin. Málið verður at staðfesta á fyrst komandi býráðsfundi.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

### Ískoyti:
Argja Bóltfelag hevur í skrivi 9. november 2014 váttað fyri kommununi byggiroknskap, at arbeiðið fyri tann áður játtaða stuðulin er gjørt. Felagið upplýsir eisini, at fyri at gera hølini liðug, vanta uml. kr. 1,3 mió í. Felagið søkir kommununa um hesa upphædd at gera hølini liðug og vísir samstundis á, at felagið hevur stórar hølistrupulleikar, har yvir 20 lið deilast um tvey skiftirúm í AB-húsinum.

FSF hevur í skrivi 6. mars 2015 til Argja Bóltfelag boðað frá, at felagið hevur fingði longt freistina at fáa skiftirúmsumstøðurnar til dómarar í lagi til í seinasta lagi 2. apríl 2015. Um hetta er ikki komið í rættlag, verður felagið at finna nýggjan heimavøll. FSF vísir í hesum sambandi til treytirnar í fylgiskjali 1, pkt, 20 í FSF reglugerðini rundskriv um treytir til leikvøll (Vallarreglugerð 2015).

Argja Bóltfelag upplýsir, at tað, sum eftir er at gera, er undirtak og loft undir skýlinum, málaraarbeiði, elarbeiðið, fast og leyst innbúgv, óvæntað, ráðgeving v.m. fyri í alt kr. 1.233.000 u/mvg.

Felagið hevur higartil staðið fyri arbeiðinum, og hevur til endamálið fingið játtað stuðul frá kommununi og FSF. Í sambandi við stuðulsjáttanina í 2014 setti kommunan sum treyt, at talan var um endaligan stuðul til byggingina.

Um stuðul skal játtast til at gera skýlið liðugt, skal víkjast frá hesi treyt. Samlaði kommunali stuðulin til verkætlanina verður tá munandi hægri enn vanligt í sambandi við stuðulsmál til bygging, at tað kann fatast sum kommunal verkætlan eisini í ljósinum av, at kommunan eigur bygningin.

Alternativ er, at kommunan yvirtekur verkætlanina við at fíggja hana fult og heilt og ger byggingina lidna. Játtanartørvur tá verður kr. 1,6 mió uttan byggiharraútreiðslur, men við mvg.

Ein leigu- og brúksavtala eigur at verða gjørd millum Argja Bóltfelag og kommununa, har Argja Bóltfelag umframt leigugjald stendur fyri øllum útreiðslum til rakstur og viðlíkahaldi av felagshølunum undir skýlinum.

Fígging til íløgutørvin kann fáast til vega av óbrúktum løgukarmi, eitt nú av løgukarminum til Gundadalshøllina, sum ikki væntast brúkt í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa til tilmælið frá 2014 um endaligan stuðul.

**Mentamálanevndin 18. mars 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr heitir á umsitingina um neyvari upplýsingar um kostnaðir, møgulig krøv í sambandi við yvirtøku av verkætlanini, og treytir í sambandi við leigu- og brúksavtalu.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu, tá dagført yvirlit pr. 18. mars 2015 fyriliggur yvir tøkar íløgupphæddir 2015 við framflytingum av óbrúktum frá gomlum árum.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Útsett.

**Ískoyti:**
Sum omanfyri lýst hevur Argja Bóltfelag í skrivi dagf. 9. november 2014 søkt kommununa um kr. 1.300.000 í stuðli til at gera felagshølini liðug. Í sambandi við meirinntøkur fyri 2014 hevur býráðið á fundi 21. mai 2015 samtykt at játta kr. 1.300.000 ætlað til liðugtgerð av felagshúsinum á Argjum.

Í sambandi við stuðulsjáttanina í 2014 setti kommunan sum treyt, at talan var um endaligan stuðul til byggingina. Samtyktin í býráðnum er at meta sum frávik frá hesum.

Sambært innlatnum byggirokniskapi dagf. 1. juni 2015 hevur samlaða arbeiðið at innrætta felagshølini, ið byrjaði í 2013, kostað kr. 6.670.000 u/mvg. Kommunan hevur higartil játtað kr. kr. 4.470.000 í stuðli. Vanliga játtar kommunan 30% í stuðli, men fordømi eru um játtaðan stuðul hægri enn 30%. Um kommunan játtar 1.300.000 aftrat í stuðli felagshølini á Argjum, verður samlaði stuðulin kr. 5.770.000 ella 86,5% av samlaðu byggiútreiðslunum.

Stuðulsskipanin eigur at verða eftirhugt saman við øðrum stuðulsskipanum á mentamálaøkinum, sí mál 14/04926.

Sum áður lýst, skal kommunan í avtalu við felagið lata felagnum brúksrætt til felagshølini, sum felagið hevur innrættað. Felagið skal somuleiðis standa fyri øllum rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslum av felagshølunum undir skýlinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.300.000 av kontu 5775 Ítróttaranlegg sum stuðul til at gera felagshølini liðug sum frávik frá vanligu stuðulsskipanini,

og at gjørd verður avtala millum kommununa og Argja Bóltfelag um brúksrætt og treytir hesum viðvíkjandi av felagshølunum undir skýlinum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>29. oktober 2015 | Blað nr.: 12503<br>Formansins merki: |

## 182/15 Nýskapanarhúsið Hugskotið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 12.10.2015 | 32/15 | 15/03756-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 243/15 | 15/03756-1 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 182/15 | 15/03756-1 |

**Málslýsing:**

Í visjónini fyri Tórshavnar kommunu, okkara høvuðsstaður - virkin og vakin er m.a. ásett at kommunan ynskir at geva nýggjum vinnum góð vakstrarlíkindi.
Í samsvari við hesa visjón hevur kommunan arbeitt við at seta á stovn eitt íverksetarahús. Í fyrstani varð arbeitt við ætlanini at stovna eitt HIT hús í hølunum í Kongagøtu 7. Hendan ætlanin var seinni slept og hølini í Kongagøtu 7 vóru seld.

Ásannandi at tað er alneyðugt at fleiri vinnuvirkir verða sett á stovn í kommununi og fyri at betra um vakstrarmøguleikarnar hjá íverksetarum, varð mett, at tað er neyðugt at gera eitt íverksetaraumhvørvi, har íverksetarar kunnu savna vitan og verða stuðlaðir innan fígging, vørumenning, útflutning v.m. Og arbeitt varð tí framhaldandi við ætlanini um at seta eitt íverksetarahús á stovn í Tórshavnar kommunu.

Mett verður, at kommunan eigur at viðvirka til, at dynamikkurin og skapanarhugurin, ið er í einum býi, sum hevur rætta lutfallið millum privatu vinnuna og almenn starvspláss, hevur betri sømdir. Kommunan má tí viðvirka til at gera karmarnar um vinnulívið meira fjøltáttaðar, og hava eitt breiðari fokus á vinnupolitiska økinum. Kommunan má skapa betri vakstrarrmøguleikar hjá teimum, ið hava góð hugskot og her er eitt íverksetararhús eitt sterkt signal at senda um, at kommunan vil vera viðspælari á vinnuøkinum.

Við hesum endamálið, varð Nýskapanarhúsið Hugskotið sett á stovn. Vinnunevndin samtykti málið 2. august 2013 og fíggjarnevndin samtykti málið 13. september 2013. Málið fekk síðani tvær viðgerðir í býráðnum og var einmælt samtykt tann 31. oktober 2013.

Síðani varð lýst eftir umsitara til Hugskotið og hesin varð settur í starv 1.apríl 2014.

Í apríl 2014 byrjaði ráðgevingin av íverksetaranum og í august 2014 fingu teir fyrstu íverksetararnir innivist í Hugskotinum. Hugskotið hevur sostatt virkað í eitt gott ár og hetta tíðarskeiðið hevur víst, at húsið nøktar ein tørv, sum var á økinum, bæði tá tað snýr seg um íverksetar, men eisini við ráðgeving til verandi vinnulív.

Hugskotið er sera væl móttikið. Síðani húsið lat upp, hava uml.110 íverksetar og fyritøkur (verkætlanir) verið í Hugskotinum og fingið ráðgeving. Tey flestu eru knýtt at húsinum í eitt longri tíðarskeið. 22 verkætlanir eru d.d. realiseraðar og 33 verkætlanir eru enn í gongd.

Tað eru ikki bert nýggjar fyritøkur/íverksetar, sum leita sær til Hugskotið eftir ráðgeving. Av teimum, sum hava verið/eru í Hugskotinum, eru 14 verandi fyritøkur í Tórshavnar kommunu, sum hava ynskt ráðgeving til ymiskar avbjóðar. Tað vísir seg at áhugin frá verandi vinnulívi gerst størri og størri.

8 íverksetar hava innivist í Hugskotinum í løtuni.

Eitt av endamálunum er eisini at skipa fyri tiltøkum, sum kunnu kveikja áhugan fyri íverksetan og at stovna egna fyritøku. Av teimum tiltøkum, sum hava verið síðani í vár eru:

-Skapandi Vinna, í samstarv við Østrøm (juni)
-Íverksetaradagur, í samstarv við Nebula (aug)
-Creative Business Cup, í samstarv við Vinnuframa og Íverksetarahúsið (sept)
-Innovatión og hugskotskapping fyri børn og ung, í samstarv við Eysturskúlan (sept til apríl)
-Íversetaraskeið, í samstarv við Kvøldskúlan (10 vikur frá sept til des)
-Hugskotskapping fyri børn og ung, í samstarv við Young Enterprise/Føroya Handilsskúla (okt/nov)
-Cafékvøld/Netverkan fyri íverksetarar (frá okt og leypandi)
-Jobmatch (des)

Framløga verður á fundinum.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at kommuna heldur fram við virkseminum í Nýskapanarhúsinum Hugskotinum, og at støða verður tikin til um virksemið skal halda fram í verandi hølum ella í nýggja Sjóvinnuhúsinum.
Eisini verður mælt til at taka støðu til, hvørt nýskapanarhúsið skal skipast sum fast rakstrarstað ella verkætlanin skal leingjast í eitt áramál afturat.

**Vinnunevndin 12. oktober 2015:** Nevndin samtyktini at leingja verkætlanina Nýskapanarhúsið Hugskotið til 1. apríl 2018 og at staðseta Hugskotið í Sjóvinnuhúsinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 183/15 Arnstein Niclasen : Umsókn vegna Ebenezer at endurnýggja leigusáttmálan til Sloans hús (2009-2383)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 56/15 | 14/04321-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 237/15 | 14/04321-18 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 183/15 | 14/04321-18 |

**Málslýsing**:
Arnstein Niclasen søkir vegnað Ebenezer um at fáa sáttmálatíðarskeiðið fyri leigumálið í Sloans húsi hóskandi framlongt.

Verandi sáttmáli, sum var galdandi í 25 ár, varð undirskrivaður 23. mai 1989.

Nýggjur sáttmáli 14/04331/8.

**Tilmæli**:
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini til at Ebenezer fær longt sáttmálan í 15 ár.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, mæla býráðnum til at góðkenna leigusáttmálan við teirri broyting, at leigari eisini hevur skyldu at halda húsini uttan.

Ein miniluti, Tróndur Sigurðsson tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tikið av skrá.

# 184/15 Útstykking á Hamrabø matr. nr. 91a, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 133/15 | 15/00969-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 149/15 | 15/00969-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 134/15 | 15/00969-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.08.2015 | 153/15 | 15/00969-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 9/15 | 15/00969-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 193/15 | 15/00969-1 |
| 7 Kollafjarðarnevndin | | | 15/00969-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 248/15 | 15/00969-1 |
| 9 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 184/15 | 15/00969-1 |

**Málslýsing**:
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri ognina matr.nr. 91a, Hamrabøur í Kollafirði. Eftir uppskotinum er pláss til umleið 21 grundstykkir millum 510 og 600 $m^2$ til sethús plus 2 grundstykkir fram við á Homrum. Grundstykkini hava tvørfall uppá millum 6 og 8 metur. Útstykkingin hevur umleið 330 m av vegi, 16 eyka p-pláss og gøtusamband til á Homrum. Vegurin er 8 m breiður, harav 1 m gongubreyt á hvørjari síða.

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting (sí skjal 1).

Skjal nr. 1. Kostnaðarmeting.
Skjal nr. 2. Støðumynd.
Skjal nr. 3. Skurðir
Skjal nr. 4 Longdarskurður

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotinum, at kunna teknisku nevnd um ætlanina og at útvega fígging til gerð av projektuppskoti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at útvega fígging til projektuppskot.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 100.000 av konto 6175, keyp og søla, til projekstuppskot.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av dispositionsuppskoti út millum 5 ráðgevarafyritøkur. Lisitation varð hildin 15. juli 2015. 2 boð komu inn.

| | |
|---|---|
| HMP | 69.000 kr. u.MVG |
| RAM consult | 88.700 kr. u.MVG |

HMP hevði soleiðis lægsta boð og hevur 13.08.2015 latið inn dispisitionuppskot. Uppskotið hevur verið til ummælis í umsitingini og smávegis rættingar eru gjørdar.

HMP hevur latið inn kostnaðarmeting. Sambært kostnaðarmetingini verður kostnaðurin, av byggibúningar arbeiðinum fyri 23 grundstykkir á miðalvídd uppá 550 $m^2$, mettur at verða 4.561 mió.u.MVG. Roknað er við eini byggitíð uppá 8 mánaðar.

Samlaði fíggjartørvurin íroknað prosjektering, eftirlit, ókent og MVG,verður sostatt kr. 6,89 mio. v.MVG, svarandi til ein $m^2$ prís uppá 542 kr/$m^2$ v.MVG og ein prís fyri eitt 500 $m^2$ grundstykki uppá 270.788 kr. v.MVG. Hesin kostnaðurin er tó treytað av at:

1. TK eigir fríøkini.
2. Útreiðslur til ráðgevara verður minkað niður í 7% av anlegsútreiðslunum.
3. Avgrevstur verður lagdur í Kollafirði í staðin fyri í Villingadali.
4. Burturbeining av fjósi verður tikið úr prosjektinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna omanfyri nevndu treytir fyri at minka um kostnaðin av grundstykkjunum og at umsitingin arbeiðir víðari við gerð av høvudsprojekti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. august 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin metir, at kostnaðurin í sambandi við projektering og útbjóðing verður 190.000 kr. v.MVG.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 190.000 kr. til projektering og útbjóðing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at játta kr. 190.000 til projektering og útbjóðing av konto 6475 og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 185/15 Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri víðkan av Skansabryggjuni og eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 17.03.2015 | 6/15 | 15/00833-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 91/15 | 15/00833-1 |
| 3 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 51/15 | 15/00833-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.09.2015 | 168/15 | 15/00833-1 |
| 5 Býráðsfundir | 30.09.2015 | 154/15 | 15/00833-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 197/15 | 15/00833-1 |
| 7 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 185/15 | 15/00833-1 |

## Málslýsing:

Fyrireikingin, við at víðka um Skansabryggjuna og Eystara havnaøki við uml. 163.000 $m^2$ og eini atløgusíðu uppá uml. 700 m, er nú komin væl áleiðis (journal nr. 14/00896). Býráðið samtykti á fundi 30. oktober 2014, at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu soleiðis, at B1-havnaøkið verður víðkað samsvarandi ætlaðu útbyggingini av havnaøkinum. Hetta málið var sent Fiskimálaráðnum 6. januar 2015 til endaliga góðkenning. Enn er einki svar komið frá Fiskimálaráðnum.

Býarskipanardeildin hevur nú í samráð við Tórshavnar havn gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri skipan av víðkanini av Skansabryggjuni og eystara havnaøki.

## Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:

Tekniski stjórin mælir til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt (j.nr. 15/00833-2,3,4,5,6,7,8, og 9) og beina málið í býráðið.

**Vinnunevndin 17. mars 2015:** Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus taka undir við tilmælinum við hesi broyting í uppskotinum j.nr. 15/00833

1) § 4 stk 4.10 verður broytt til B1.
2) Eindin B á tí innara molanum í kortskjali 3 verður breiðkað, so tað samsvarar við byggiøki B3 á kortskjali 2 á tí innara molanum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum tí at ikki aðrir møguleikar eru kannaðir fyri víðkaðari góðshavn í kommununi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og broytingunum hjá vinnunevndini.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum tí at ikki aðrir møguleikar eru kannaðir fyri víðkaðari góðshavn í kommununi

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá byggi- og býarskipanar-nevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Nú fór Bjørghild Djurhuus

**Ískoyti:**
Uppskotið til serstaka byggisamtykt hevur ligið alment frammi og seinasta freist at mótmæla ella koma við broytingaruppskoti var 1. juni 2015.

Inn komu 18 mótmælir og broytingaruppskot. Fleiri av mótmælunum eru stutt og snúgva seg mest um umhvørvið kring Skansan og útsýnið frá Skansanum verður skemma. Men so eru nakrar, ið eru meira víðfevndar og víst verður á meira nágreiniligar alternativar loysnir.

Mentamálaráðið hevur saman við Føroya Fornminnissavni, í teirra mótmæli, fingið Munin at framleiða eina nýggja visualisering av útsýninum frá Skansanum. Hendan vísir eina aðra mynd enn visualiseringarnar, sum er partur av uppskotinum til serstøku byggisamtyktina.

**Í hesum sambandi hevur Tórshavnar havn biðið LBF um at eftirkanna visualiseringarnar í serstøku byggisamtyktini. Teir komu fram til, at hesar vóru rættar. Ein munur á visaluseringunum er, at tann hjá Mentamálaráðnum vísir útsýnið frá 18,1 m, sum er hæddin av ovara vollanum, og tann hjá LBF er frá 18,1 m + ein manshædd, tvs. 19,9 m.**

Onkur kæra vísir á, at ætlaði bryggjukanturin er alt ov tætt við Skansan.

**Løgtingslóg um friðing heimilar at friða upp til 100 m frá fornminnum. Í útbyggingarætlanini er ein smábátahavn út fyri Skansan og sjálv útbyggingin er hildin í minsta lagi 100 m frá skansanum.**

Mentamálaráðið vísir eisini í síni kæru á, at Yvirfriðingarnevndin ikki hevur tikið endaliga støðu till útbyggingarætlanirnar. Í hesum sambandi má Tórshavnar havn eisini taka upp aftur samskifti við Yvirfriðingarnevndina.

Aðrar kærur føra fram at útbyggingarætlanin hevur við sær meira larm og størri útlát av evnum, sum hava skaðilig árin á heilsuna.

**Umhvørvisárinskanningin (VVM) vísir, at tað ikki kemur at larma meira í miðbýnum við útbyggingini, og útlátið frá havnavirkseminum liggur langt undir teimum markvirðum, sum ES hevur ásett.**

Fleiri kærur vísa á, at útbyggingin av havnaøkinum skuldu heldur verið gjørdar aðrastaðnis í Tórshavnar kommunu t.d. á Sundi ella Kollafirði.

**Í Umhvørvisárinskanningini (VVM) verður víst á, at áðrenn avgerð var tikin um at arbeiða við hesari loysnini fyri útbygging av havnarøkinum í kommununi eru metingar og kanningar gjørdar av øðrum loysnum sum ein nýggj havn á Glyvursnesi, útbygging á Sundi og á Oyrareingjum.**

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at hildið verður fast við samtykta uppskotið til serstaka byggisamtykt vísandi til omanfyri nevndu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. september 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Halla Samulelsen og Sigrun Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, ið mælir frá at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt, grundað á nógvu mótmælini frá borgarunum og at aðrir myndugleikar sum Yvirfriðingarnevnd og Býarskipanarnevnd ikki hava givið síni endaligu loyvir, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu
Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu.
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu
Elin Lindenskov

**Ískoyti:**
Politisk avgerð er gjørd um broyting av útbyggingarætlanunum.

Avtala er gjørd við løgfrøðing hjá Innlendismálaráðnum um at senda Heilsu- og Innlendismálaráðnum tey innkomnu mótmælini og viðgerðina í byggi- og býarskipanarnevndini og býráðnum, saman við broytta uppskotinum av útbyggingarætlanini og uppskoti til broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. So skal hann gera eina meting av, um tað er neyðugt við nýggjari kunngerð og framløgu av broyttu almennu byggisamtyktini.

Mett verður ikki, at neyðugt er at gera serstaka byggisamtykt til broyttu útbyggingarætlanina. Hetta er grundað á, at ætlanir nú bert eru um at gera eina útbygging, sum einans hevur við beinleiðis havnarakstur at gera, sambært ásetingunum fyri umráðispartin B1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og ikki eitt blandað øki sum upprunaliga útbyggingarætlanin var.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstøk byggisamtykt ikki verður gjørd til broyttu útbyggingarætlanina og at innkomnu mótmælini og viðgerðin í byggi- og býarskipanarnevndini og býráðnum, saman við broytta uppskotinum av útbyggingarætlanini, umvegis býráðið, verður sent Heilsu- og Innlendismálaráðnum til metingar í samb. við viðgerð av almennu byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tjóðveldið mælir frá at samtykkja tilmælið, tí tað samsvarar ikki við mannagongdirnar um almenna framløgu og hoyring av samtyktum byggisamtyktum.

Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

Broytingaruppskotið hjá Tjóðveldi kom sostatt ikki til atkvøðugreiðslu.

# 186/15 Broyting av almennu byggisamtyktini í sambandi við víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 27/14 | 14/04429-1 |
| 2 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 212/14 | 14/04429-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 198/15 | 14/04429-1 |
| 4 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 186/15 | 14/04429-1 |

## Málslýsing:

Fyrireikingin, við at víðka um Skansabryggjuna og Eystara havnaøki við uml. 163.000 $m^2$ og eini atløgusíðu uppá uml. 700 m, er nú komin so væl áleiðis, at klárt er at broyta almennu byggisamtyktina sambært ætlanini. (journal nr. 14/00896).

Umhvørvisárinskanning fyri útbyggingina er send Umhvørvisstovuni til góðkenningar, modelroynd og aldusimuleringar eru gjørdar á DHI og Yvirfriðingarnevndin hevur játtað útbyggingini.

Áðrenn farið verður undir arbeiðið, er neyðugt at víðka B1-havnaøki í almennu byggisamtyktini fyri ætlaðu útbyggingina.

## Tilmæli:

Tekniski stjórin mælir til at B1-havnaøki í almennu byggisamtyktini verður víðkað sambært kortskjali, dagfest 23.09.2014.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**

Politisk avgerð er gjørd um broyting av útbyggingarætlanunum (sí mál nr.15/00833), tí verður uppskotið til víðkan av B1 havnaøkinum í almennu byggisamtyktini broytt samsvarandi nýggju útbyggingarætlanini.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nýggja uppskotið, dagfest 19.10.2015, til broyting av almennu byggisamtyktini verður góðkent.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Málið er ikki búgvið at taka støðu til, so leingi tað ikki er greitt, hvussu málið um almennu byggisamtyktina verður viðgjørt víðari og mælir frá at samtykkja uppskotið.

Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og trimum ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Sigrun Mohr, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

Broytingaruppskotið hjá Tjóðveldi kom sostatt ikki til atkvøðugreiðslu.

# 187/15 Uppskot til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 192/15 | 15/03675-1 |
| 2 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 187/15 | 15/03675-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við viðgerð av byggimálinum fyri matr. nr. 1228g, Tórshavn, har, orsakað av hæddarmuninum á grundstykkinum, søkt var um at byggja hús í 3 hæddum við sløttum taki, samtykti byggi- og býarskipanarnevndin á fundi 8. mai 2015, at umsitingin skal taka stig til at broyta byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at tað ber til at byggja hús í trimum hæddum her. (j.nr. 14/05212)

Vanliga skulu tær serstøku byggisamtyktirnar loyva meira bygging enn almenna byggisamtyktin loyvir fyri umráðispartin, sum serstaka byggisamtyktin liggur í. Hendan serstaka byggisamtyktin liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini, sum ikki loyvir bygging av sethúsum í 3 hæddum.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 28. august 2015, eitt mál (j.nr. 15/02287) um broyting av almennu byggisamtyktini. Broytingin snýr seg m.a. um, at ásetingarnar fyri A1 økir verða broyttar soleiðis, at víkjast kann frá ásetingunum um tal av hæddum í serstakari byggisamtykt, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur nátúrliga inn.

Í útstykkingini við Hjaltarók liggja fýra av teimum ovastu grundstykkini í serliga brøttum lendið. Tað snýr seg um matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g. Hesi grundstykkini kundu komið undir ásetingina at lendið er soleiðis hátta at tað fellur natúrliga inn, at húsini á hesum grundstykkjum kunnu verða í trimum hæddum.

Í sambandi við uppskotið um hesa broytingina av serstøku byggisamtyktini verður eisini mælt til at broyta aðrar ásetingar í §4, soleiðis at tær samsvara almennu byggisamtyktini.

Verandi §4 í serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn

**§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig má í mesta lagi verða 0,3

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Bilhús/bilskúr/úthús verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer uppum 35 $m^2$.

Broytt §4 í serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn

**§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig sambært ásetingum fyri A1-økir í almennu byggisamtyktini.

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Grundstykkini matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g kunnu byggja í 3 hæddum.

Stk. 4. Hægsta punkt við útvegg skal ikki verða hægri enn 9,0 m frá planering.

Stk. 5. Bilhús/bilskúr/úthús/yvirdekkað øki verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer upp um 10% av grundøkinum, tó í mesta lagi 50 $m^2$.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at §4 í serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn, verður broytt frá:

**§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig má í mesta lagi verða 0,3.

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Bilhús/bilskúr/úthús verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer upp um 35 $m^2$.

**til**

**§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig sambært ásetingum fyri A1-økir í almennu byggisamtyktini.

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Grundstykkini matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g kunnu byggja í 3 fullum hæddum.

Stk. 4. Hægsta punkt við útvegg skal ikki verða hægri enn 9,0 m frá planering.

Stk. 5. Bilhús/bilskúr/úthús/yvirdekkað øki verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer upp um 10% av grundøkinum, tó í mesta lagi 50 $m^2$.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 188/15 Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri B6 vinnuøkið Yviri við Strond

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 129/15 | 15/01720-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 126/15 | 15/01720-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 177/15 | 15/01720-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 195/15 | 15/01720-1 |
| 5 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 188/15 | 15/01720-1 |

**Málslýsing:**
B6 vinnuøki Yviri við Strond hava m.a. ásetingar, í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, um mest loyvdu hædd av bygningi uppá 8,0 m. Í einum parti av hesum økinum er planeringshæddin uml. 6 m undir veghædd.

Eik Banki hevur ætlanir um at utbyggja høvuðssæti Yviri við Strond við, at byggja eina hædd omaná verandi bygning og opna bygningin meira ímóti høvuðsvegnum Yviri við Strond við eini útbygging til høvuðsinngond. Verandi bygningur liggur fyri stóran part undir høvuðsvegnum.

Umsitingin metir, at tað hevði verið rættari at ásett eina mestu hædd á bygging í mun til høvuðsvegin, t.d. mest loyvda hædd er 10 m oman fyri veghædd.

Av tí at B6 vinnuøkið liggur upp at Skansanum, ásetur byggisamtyktin fyri B6 vinnuøki eisini, at bygging einans má fara fram, eftir at loyvi er fingið frá friðingarnevndini.

Friðingarnevndin hevur viðgjørt fyribils tekningar fyri ynsktu útbyggingina og góðkent ætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at kap. 4, §13, stk. 7 í almennu byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu, verður broytt frá;

Eingi hús og eingin húsalutur má vera hægri enn 8 m.

Til
Eingi hús og eingin húsalutur má vera hægri enn 10 m yvir vegin Yviri við Strond á strekkinum út fyri bygningin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla broytingini av almennu byggisamtyktini fyri B6-øki var 7. september 2015. Tá freistin var farin, høvdu vit móttikið tvey mótmæli/viðmerkingar, eina frá Mentamálaráðnum og eina frá Søvn landsins, sum mest handlar um umsóknina um útbygging av Eik banka.

Poul Gert Hansen boðar vegna Mentamálaráðið frá, at orsakað av at nýtt landsstýri ikki er skipað eftir løgtingsvalið 1. september 2015, ber ikki til hjá Mentamálaráðnum at gera viðmerkingar til málið innan freistina 7. september 2015. Mentamálaráðið vil við hesum boða frá, at hoyringsskriv verður sent kommununi, tá landsstýrið er skipað.

Tórálvur Weihe boðar frá vegna Søvn landsins, at víst verður til viðmerkingar, dagf. 28. desember 2014, sum svar til teldupost frá kommununi 10. desember 2014 (j. nr. 14/03193-10) í sambandi við umsókn um frávik um mest loyvdu hædd fyri B6-øki í sambandi við bygningin hjá Eik. Hann vísir á, at tað er ósamsvar í tekningstilfarinum, sum eru send til Søvn landsins.

Eisini vísir hann á, at longu tá fyrstu ferð varð bygt á økinum í 1975-76, vóru strong krøv sett fram frá kommununi og náttúrufriðingarmyndugleikunum. Náttúrufriðingarnevndin sá helst, at eingin bygningur varð settur á økið, men gingu við til byggingina treytað av, at bygningurin var lægri og fluttur longur oman. Yvirfriðingarnevndin setti harafturat treytir um, at fjøran uttan fyri Skansan og fram við strondini út fyri ætlaða bygninginum verður varðveitt og tað aldrin verður bygt millum hendan bygningin og Skansan.

Til hetta er at siga, at málið um útbygging av Eik banka er viðgjørt av Náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu, sum hevur givið góðkenning til ætlanina hjá Eik banka, treytað av at onnur neyðug loyvi eru fingin til vega (j. nr. 14/03193-11). Yvirfriðingarnevndin hevur síðani staðfest hesa avgerð (j. nr. 14/03193-13).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at hildið verður fast um ætlaðu broytingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Helena D. á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tann 1. oktober kom mótmælið frá Mentamálaráðnum, sum er nevnt omanfyri var seinkað orsakað av, at landsstýri ikki var skipað eftir løgtingsvalið 7. september 2015.

Í mótmælinum verður sagt, at broyting í almennu byggisamtyktini fyri b6 vinnuøki Yviri við Strond er av slíkum slag, at tey kunnu hava við sær óbótaligan skaða fyri Havnar skansa, sum er eitt týdningarmiklasta fornminni føroyinga. Tað er tí týdningarmikið, at mett verður um árinið á mentanarlandslagið og á upplivingina av Skansanum, umframt hvørji samfelagsvirði kunnu fara fyri skeyti í sambandi við at ásetingarnar í byggisamtyktini verða broyttar. Í hesum

sambandi var serstaka byggisamtyktin fyri útbygging av Sklansabryggjuni og Eystara havanøki eisini nevnd.

Eisini verður víst til omanfyri standandi mótmæli frá Søvn Landsins har nevnt verður, at fría útsýnið frá Skansanum í ein landnyrðing verður avmarkað, um byggingin oman móti fjøruni verður hægri.

Til hetta er at siga, at málið um útbygging av Eik banka er viðgjørt av Náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu, sum hevur givið góðkenning til ætlanina hjá Eik banka, treytað av at onnur neyðug loyvi eru fingin til vega (j. nr. 14/03193-11). Yvirfriðingarnevndin hevur síðani staðfest hesa avgerð (j. nr. 14/03193-13).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at hildið verður fast um ætlaðu broytingina vísandi til, at Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndin hava góðkent ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Vísandi til mótmælini frá mentamálaráðnum og Søvnum landsins verður mælt býráðnum frá at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Sigrun Mohr, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Anfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Broytingaruppskotið hjá Tjóðveldi kom sostatt ikki til atkvøðugreiðslu.

# 189/15 Broyting av ferðaætlanini í sambandi við koyring til Boðanesheimið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.02.2014 | 12/14 | 14/00767-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 41/15 | 14/00767-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 03.06.2015 | 71/15 | 14/00767-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 107/15 | 14/00767-1 |
| 5 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 189/15 | 14/00767-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 134/15 | 14/00767-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tá ferðaætlanin var gjørd av nýggjum í 2011, koyrdi leið 5 fram við Boðanesheiminum í 6 vikur. Nógvar klagur komu frá borgarum í Kaldbak, sum ynsktu, at leið 5 ístaðin koyrdi eftir R. C. Effersøes gøtu.

Tvey tey nærmastu bussstoppistøðini hjá Boðanesheiminum eru; eitt er á Fútalág (450 m) hitt er á Tórgarðsgøtu (600 m), og koyra bæði leið 2 og 3 har.

Síðani Boðanesheimið læt upp í 2012, eru áheitanir komnar um at fáa Bussleiðina at koyra fram við Boðanesheiminum. Hesar broytingar í ferðaætlanini skulu gerast, uttan at tað kostar eyka fyri Bussleiðina.

Ein broyting kann gerast í tíðarskeiðinum av degnum, tá bussarnir koyra tríggjar ferðir um tíman, frá kl. 08.00 til áleið 17.00. Umsitingin hevur hugt eftir, hvørjir møguleikar eru til staðar, uttan at broyta allar farleiðirnar. Tann eina túrin um tíman, koyrir leið 2 og leið 3 fram við Boðanesheiminum, ístaðin fyri eftir Tórgarðsgøtu, Fútalág og Hoyvíksvegnum Besta loysnin til uppskot er, at gera broytingar á leið 2, tá koyrt verður Yviri við Strond, og lata bussin koyra beint fram við Boðanesheiminum og koma aftur í rutuna yviri við Hoyvíksvegin /Eystara Ringveg. Hin broytingin er, tá leið 3 kemur eftir Eystara Ringveg/Hoyvíksveg og lata bussin koyra beint fram við Boðanesheiminum og koma aftur í rutu við Tórgarðsgøtu/Yviri við Strond.

Nakrir vansar eru við at gera hesar broytingar, tí leið 2 og 3 koma ikki at koyra fram við Miðlon, Posthúsinum, Lágargarði, Tjarnagarði og Eysturskúlanum, har sum nógv fólk vanliga ferðast. Ein annar vansi, við at gera hesar broytingar, er, at bussurin fer at koyra eitt langt strekki yviri við Boðanesheimið, har næstan einki fólk býr og bara eitt stoppistað. Ætlanin er, at restina av túrinum hjá báðum leiðum er at brúka somu minuttøl í ferðaætlanini, fyri at órógva tey ferðandi minst møguligt, sum brúka hesa báðar farleiðir.

**Fíggjarligu viðurskiftir:**
Útreiðslur til at prenta nýggjar ferðaætlanir, sum skulu setast upp við hvørt bussstoppistað. Uppsetan av fleiri bussstoppistøðum og møguliga gera busslummar yviri við Boðanesheimið.

Nevndin skal taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við hesum uppskoti, og um tað skal sendast til hoyringar hjá viðkomandi pørtum.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Ásannandi at ein broyting í verandi ferðaætlan fer at skapa ov nógv órógv hjá teimum ferðandi, samtykti nevndin ikki at broyta ferðaætlanina á leið 2 og 3. Nevndin ynskir, at umsitingin kemur við kostnaðarætlan fyri eina møguliga víðkan av bussleiðini fram við Boðanesheiminum til næsta fund.
**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt kannað kostnaðin fyri eini alternativari ætlan, har ferðaætlanin er víðkað til eisini at fevna um koyring fram við Boðanesheiminum.

Umsitingin hevur teknað tvær nýggjar leiðir, Leið A og Leið B, og roknað uppá hesar, við tveimum møguleikum. Kostnaðurin er roknaður út frá, at ein arbeiðstakari tekur 650 kr. um tíman fyri effektiva koyritíð. Kostnaðarmetingin er roknað út í, hvat kommunan kann koma at gjalda árliga fyri eina leið fram við Boðanesheiminum. Víst verður á, at ronað er við, at hvør bussur koyrur 50 vikur um árið, tað vil siga at heiligdagar eru ikki roknaðir við (talan er um eini 14 heiligdagar um árið, har bussarnir ikki koyra). Allir prísir eru við MVG.

**Leið A**:
Farleiðin er henda:

Farstøðin – SMS – Norðurlandahúsið – Villingardalsvegur – Undir Brúnni – Vegurin Langi – Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur – Boðanesheimið – Yviri við Strond – Farstøðin.
Samlað longd uml. 10,5 km og svarar hetta til ein túr uppá uml. 25 min.

Møguleiki 1:
Bussurin koyrir mánadag til fríggjadag tvær ferð um tíman frá kl.07.00 – 18.00.

Fíggjarlig viðurskifti:
Hetta kemur árliga at kosta kr. 1.582.682,-.

Møguleiki 2:
Bussurin koyrir mánadag til fríggjadag tvær ferðir um tíman frá kl.07.00-18.00 og eina ferð um tíman frá kl.18.00 til 20.00.

Fíggjarlig viðurskifti:
Hetta kemur árliga at kosta kr. 1.726.562,-.

**Leið B:**
Farleiðin er henda:

Farstøðin – Jónas Broncks gøta - Steinatún – Jóannesar Paturssonar gøta – Rundkoyringin á Frælsinum – Jóannesar Paturssonar gøta - Steinatún – Jónas Broncks gøta – Yviri við Strond – Boðanesheimið – Yviri við Strond – Farstøðin (6,1 km) svarandi til uml. 15 min.

Møguleiki 1:
Bussurin koyrir mánadag til fríggjadag tríggjar ferðir um tíman frá kl.07.00 – 18.00.

Fíggjarlig viðurskifti:
Hetta kemur árliga at kosta kr. 1.424.414,-.

Møguleiki 2:
Bussurin koyrir mánadag til fríggjadag tríggjar ferðir um tíman frá kl.07.00-18.00, eina ferð um tíman frá kl.18.00 til 20.00, og leygardag eina ferð um tíman frá kl.10-16.

Fíggjarlig viðurskifti:
Hetta kemur árliga at kosta kr. 1.510.742,-.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Marin Katrina Frýdal, nevndarlimur, ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, krevur, at umsitingin kemur við eftirmeting av broytingini til næsta fund.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, átalar at farleið 5 er broytt uttan nevndarviðgerð, uttan viðgerð í staðbundnu nevndunum, at trygdin hjá bussførarum og ferðafólki verður sett í vanda og krevur málið fyri býráðið.

**Ìskoyti:**
Uttan at skula broyta farleiðina hjá bæði leið 2 og leið 3, var tað nemmast at lata leið 5 koyra til Boðanesheimið.

Leið 5V (Kaldbak til Kirkjubø) koyrir seks ferðir um dagin til Boðanesheimið, fyrsti túrur kl. 07.43 og seinasti túrur kl. 22.16 og koyrir leið 5E (Kirkjubø til Kaldbak) eisini seks ferðir um dagin til Boðanesheimið, fyrstu túrurin kl. 07.48 og seinasti kl. 22.25. Bussførarnir á leið 5 siga, at tað dagliga hava verið millum 6 og 10 fólk, sum hava brúkt hetta bussstoppistað, hetta samsvarar eisini væl við tølini í ferðafólkaskipanina.

Starvsfólk og avvarðandi av búfólkunum eru glað um at bussur nú koyrir til Boðanesheimið. Ynski kom tó frá starvfólki um fleiri túrar, serliga tá arbeiðisskifti er á heiminum. Tað kann tó verða eitt sindur trupult, tí øll møta ikki til somu tíð, men nakrar vaktir yvirlappar hvørt annað.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Málið beint í teknisku nevnd til víðari viðgerð.

# 190/15 Beinkirnir í Steinatúni, tiknir burtur í summarfrítíðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 108/15 | 15/03724-1 |
| 2 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 190/15 | 15/03724-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 130/15 | 15/03724-1 |

**Málslýsing:**
Marin Katrina Frýdal, nevndarlimur, ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, krevur eina kunning um málið til næsta fund.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, átalar at beinkirnir til Bussleiðina eru tiknir burtur úr Steinatúni uttan nevndarviðgerð og uttan hoyring í Eldraráðnum og MBF og krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Málið beint aftur í teknisku nevnd til víðari viðgerð.

# 191/15 Sp/f Carl Aug.Jensen, matr. nr.: 149a, Kollafjørð : Ynskir at almenna WC í Kollafirði verður beint burtur ella flutt (2013-2233)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 99/14 | 14/00410-4 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 23.06.2014 | 14/14 | 14/00410-4 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 106/15 | 14/00410-4 |
| 4 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 191/15 | 14/00410-4 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 11/15 | 14/00410-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við vegagerðina hjá Landsverki á vegamótinum viðíbindingina við Sjógv, hevur samskifti verið millum kommununa og Landsverk um ymisk vegateknisk viðurskifti. Harumframt hava umboð frá sp/f Carl August Jensen eisini verið á fundi í sambandi við broyttum ferðsluviðurskiftum (parkering og til-/frákoyringarmøguleikar) eysan fyri teirra ogn, matr. nr.149a, Kollafjørður. Á fundinum var spurt um framtíðar ætlanir hjá kommununi og í framhaldi av hesum, hevur samskifti verið við eigaran um at fáa flutt almenna toilettið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongar viðmerkingar

**Upplýsingar frá umsitingini.**
Í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini fyri 2014, var komið inn á spurningin um almenn toilett, millum annað í Steinatúni og í Kollafirði. Niðurstøðan tá var, at tað fyriliggur eingin ætlan at flyta almenna toilettið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Fíggjarlig viðurskifti**
Tað fyriliggur eingin kostnaðarmeting.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Málið hevur ikki verið til hoyringar á øðrum deildum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Málið hevur ikki verið til hoyringar hjá øðrum myndugleikum.

**Skjøl**
Víst verður til skjøl í málinum viðv. arbeiðinum at dagføra vegamótið við Sjógv.

**Tilmæli:**
Vísandi til at eingin peningur er avsettur til endamálið, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at boða frá, at eingin ætlan er at flyta almenna toilettið.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 23. juni 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Marin Katrina Frýdal, nevndarlimur, ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Ein minniluti, Elin Lindenskov og Sigrun Mohr, mæla til at málið verður viðgjørt saman við málinum um kommunal wc á einum seinni fundi.

Ein annar minniluti, Marin Katrina Frýdal, átalar at kommunala wc í Kollafirði er burturbeint uttan viðgerð í teknisku nevnd og uttan at hava verið til hoyringar í Kollfjarðarnevndini og krevur málið fyri býráðið.

Ein triði minniluti, Bogi Andreasen, átalar at kommunala wc í Kollafirði er burturbeint uttan viðgerð í teknisku nevnd og uttan at hava verið til hoyringar í Kollfjarðarnevndini.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Borgarstjórin greiddi frá málinum. Ynski hjá staðbundnu nevndini er at fáa tað nýggja wc við bátahylin.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Málið beint aftur í teknisku nevnd.

## 192/15 Áheitan frá borgara um at gera vegastrekkið við Dalalíð liðugt (2011-2060)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 42/15 | 14/02182-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 99/15 | 14/02182-8 |
| 3 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 75/15 | 14/02182-8 |
| 4 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 86/15 | 14/02182-8 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 247/15 | 14/02182-8 |
| 6 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 192/15 | 14/02182-8 |

**Málslýsing: (sí eisini mál nr. 2011-2060 og 2000-1640)**
Í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagf. 6. september 2011, vísir Tummas Justinussen á, at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós, og at íbindingin til Marknagilsvegin er óskipað. Ynski er, at Dalalíð verður gjørd liðug.

Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Tummas Justinussen hevur aftur gjørt vart við at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós og ynskir at fáa dagført vegin nú. Umsitingin hevur svarað í skrivi til Tummas O. Justinussen, at farið verður ikki undir arbeiðið at dagføra vegin fyrr enn fígging fyriliggur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig kostnaðarmeting av eini dagføring av Dalalíð. Umsitingin hevur latið gera eina fyribils kostnaðarmeting álj. uml. 0,7 mió. kr. sambært skjali nr. 14/02182-10 og 14/02182-11.

Umsitingin greiðir frá.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Nevndin samtykti, at farast skal undir at gera arbeiðið, fíggjað av kt. 8175, og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt ítøkiligt útbjóðingartilfar.
Í sambandi við tilgongdina at fáa bjóðað arbeiðið út, hevur umsitingin havt samskifti við íbúgvar við Dalalíð. Tað varð skjótt staðfest, at umfangið av at dagføra Dalalíð, varð munandi størri og meira umfatandi enn ætlað, og av somu orsøk er lægsta innkomna tilboðið væl hægri enn upprunaliga metingin.

Víst verður til lisitatiónsprotokoll, tillagað tilboð, sum er grundarlagið undir uppskoti til sáttmála við arbeiðstakaran Andrias Berg Sp/f.

**Viðkomandi skjøl:**
TK j. nr. 15/02591-1 : Yvirlitsplanur
TK j. nr. 15/02592-1 : Tilboðslisti
TK j. nr. 15/03386-5 : Lisitatiónsprotokoll
TK j. nr. 15/03386-6 : Tillagað tilboð
TK j. nr. 15/03608-1 : Fíggjarskjal, sum er samlað kostnaðarmeting

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Írestandi fíggjartørvurin er áljóðandi kr. 818.212,- sambært fíggjarskjali, j. nr. 15/03608-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 820.000,- av íløgukarminum fyri vegir, deild 8175.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 193/15 P/F Guttesen & Staksberg : Umsókn um at kommunan yvirtekur vegin Maritugøtu, matr. nr. 1øi, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 95/15 | 15/03449-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 250/15 | 15/03449-4 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 193/15 | 15/03449-4 |

**Málslýsing:**
P/F Guttesen & Staksberg søkir í skrivi, dagf. 28. august 2015, um at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Maritugøta, matr. nr. 1øi, Hoyvík.

Umsiting kommununnar hevur í notati, dagf. 11. september 2015, støðulýst vegøkini (j.nr. 15/03439-3), har tað framgongur, at vegøkini eru óslitin, tekniskt í góðum standi og at støði og dygd á vegnum er á tí støði, sum krevst fyri at vegirnir kunnu lúka ásetingarnar, í verandi almennu byggisamtyktini, um slíkar vegir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>29. oktober 2015 | Blað nr.: 12528<br>Formansins merki: |

# 194/15 Yvirtøka av vegøki matr. nr. 1180n, Tórshavn, vegamóti í Svanga – Grønlandsvegur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 96/15 | 15/03515-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 251/15 | 15/03515-2 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 194/15 | 15/03515-2 |

**Málslýsing:**
Borgarar úti í Svanga hava í fleiri umførum, sum einstaklingar og í felag, vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan bøtir ella yvirtekur privata vegøkið á vegamótinum í Svanga – Grønlandsvegur, matr. nr. 1180n (j. nr. 14/01663, 14/02491 og 15/02362).

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 15/03515-1)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at boðað verður umsøkjarunum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið matr. nr. 1180n, Tórshavn, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 195/15 Yvirtøka av vegnum Heinagøta, matr. nr. 1413m og 1412ab, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 97/15 | 15/03520-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 252/15 | 15/03520-2 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 195/15 | 15/03520-2 |

**Málslýsing:**
Borgarar við Heinagøtu hava í fleiri umførum, sum einstaklingar og í felag, vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan bøtir ella yvirtekur privata vegøkið Heinagøta, matr. nr. 1413m og 1412ab, Tórshavn (j. nr. 14/00169, 2012-1247, 2010-0239 og 2003-1764)

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 15/03520-1)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at boðað verður umsøkjarunum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið, ið er fevnt av nevndu matriklum, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 196/15 Yvirtøka av vegøki matr. nr. 683aq, Tórshavn, síðugøta við vegamótið Skúlagøta-Stoffalág

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 98/15 | 15/03533-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 253/15 | 15/03533-2 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 196/15 | 15/03533-2 |

**Málslýsing:**
Ánarin av vegøkinum matr. nr. 683aq, Tórshavn, hevur í fleiri umførum vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan yvirtekur privata vegøkið, sum er síðugøta við atkomu til 6 grundøki, við vegamótið Skúlagøta – Stoffalág (j. nr. 14/04133 og 14/03107).

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 15/03533-1).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at yvirtaka vegøkið matr. nr. 683aq, Tórshavn, uttan kostnað fyri kommununa og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 197/15 Sp/f Matrikul 1228a søkir um at kommunan yvirtekur vegøki á Hjaltarók, matr. nr. 1227a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 99/15 | 15/03585-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 255/15 | 15/03585-2 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 197/15 | 15/03585-2 |

**Málslýsing:**
Sp/f Matrikul 1228a søkir í telduposti, dagf. 4. apríl 2013, um at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Maritugøta, matr. nr. 1øi, Hoyvík.

Umsiting kommununnar hevur í notati, dagf. 17. september 2015, støðulýst vegøkini (j. nr. 15/03585-1), har tað framgongur, at vegøkini eru óslitin, tekniskt í góðum standi og at støði og dygd á vegnum er á tí støði, sum krevst fyri at vegirnir kunnu lúka ásetingarnar í verandi almennu byggisamtyktini, um slíkar vegir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tikið av skrá.

# 198/15 Útleiðingar út á Sjógv frá Sandvíkarhjalla og Yviri við Strond (Eystfalssker-Válgaravík-Kommandørhúsunum) (2013-0562)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 101/15 | 14/01792-35 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 246/15 | 14/01792-35 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 198/15 | 14/01792-35 |

**Málslýsing:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá kommununi, er ætlanin at fara undir at gera arbeiðið liðugt at leiða kloakkirnar frá Sandvíkarhjalla og Yviri við Strond út á sjógv. Talan er um arbeiði á økinum við Eystfalssker, Válgaravík og undir Komandørhúsunum og út á streymasjógv.

Arbeiðini fara at fevna um at dagføra verandi útleiðingar, so at hesar framyvir lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni við at leiðingarnar koma út minst 1 m undir størstu fjøru.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2.500.000,- og er ynski um at fáa heimild at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftaná. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í vár.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og er ætlanin at nýta 2,5 mió. kr. til dagføring av útleiðingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 2.500.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.
**Ískoyti:**
Avgjørt var at bjóða útleiðingarnar á sjógv sum 4 arbeiðstøkur, og var lisitatión hildin 18. juni 2013, kl. 14.00.

Arbeiðstøkurnar vóru hesar:
1. Kloakkútlát á Hvítanesi
2. Kloakkútlát Válgaravík Norður
3. Kloakkútlát Válgaravík Suður
4. Kloakkútlát Eystfalssker

Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, j. nr. 2013-0562/8.

Innkomnu tilboðini vóru hesi:

1. Kloakkútlát á Hvítanesi:

| | | |
|---|---|---|
| **Sp/f Maskingrevstur** | **kr.** | **634.182** |
| Sp/f Plan | kr. | 1.938.640 |
| Jakobsen & Hansen onki boð | | |
| Andrias Berg | kr. | 637.650 |
| Articon | kr. | 1.563.272 |
| J & K Petersen | kr. | 1.407.100 |
| Meting | kr. | 670.000 |

2. Kloakkútlát Válgaravík Norður

| | | |
|---|---|---|
| Sp/f Maskingrevstur | kr. | 628.175 |
| Sp/f Plan | kr. | 1.355.900 |
| Jakobsen & Hansen onki boð | | |
| **Andrias Berg** | **kr.** | **619.500** |
| Articon | kr. | 1.278.718 |
| J & K Petersen | kr. | 996.600 |
| Meting | kr. | 575.000 |

3. Kloakkútlát Válgaravík Suður

| | | |
|---|---|---|
| Sp/f Maskingrevstur | kr. | 647.900 |
| Sp/f Plan | kr. | 1.260.450 |
| Jakobsen & Hansen onki boð | | |
| **Andrias Berg** | **kr.** | **585.250** |
| Articon | kr. | 1.288.959 |
| J & K Petersen | kr. | 960.500 |
| Meting kr. 580.000 | | |

4. Kloakkútlát Eystfalssker

| | | |
|---|---|---|
| **Sp/f Maskingrevstur** | **kr.** | **714.056** |
| Sp/f Plan | kr. | 1.226.750 |
| Jakobsen & Hansen onki boð | | |
| Andrias Berg | kr. | 750.550 |
| Articon | kr. | 1.428.800 |
| J & K Petersen | kr. | 1.171.390 |
| Meting kr. 770.000 | | |

Býráðið hevur hin 21. mars 2013 játtað 2,5 mió.kr. til øll arbeiðini. Í tí sambandi var farið undir arbeiðini 1, 2 og 3, sum sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 2013-0562/13, 2013-0562/14 og 2013-0562/15 samanlagt var innanfyri játtaðu fíggingina. Vegna væntandi fígging var ikki farið undir arbeiði nr. 4.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Nú tað fyriliggur tøkur framfluttur íløgukarmur innan §6, kto 6875 kloakkir, er rúm fyri at fara undir arbeiði nr. 4: Kloakkútlát Eystfallsker eisini.

Sambært fíggjarligari uppgerð, j. nr. 2013-0562/26, verður samlaði íløgutørvurin fyri arbeiði nr. 4: Kloakkútlát Eystfallsker uml. 1,1 mió. kr. (íroknað mvg, og aðrar útreiðslur).

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum uppá arbeiðstøku nr. 4, og at játta kr. 1,1 mió. av framfluttum íløgukarmi 6875-L00002, til kto. 6875, L68014, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Útleiðingar á sjógv, Sandvíkarhjalla/Yviri við Strond, L68014, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 89.056,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 199/15 Møguligt samstarv við IRF um viðgerð og burturbeining av rottangaevju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 83/14 | 14/01625-1 |
| 10 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 199/15 | 14/01625-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.05.2014 | 104/14 | 14/01625-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 98/14 | 14/01625-1 |
| 4 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 186/14 | 14/01625-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.04.2015 | 27/15 | 14/01625-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 97/15 | 14/01625-1 |
| 7 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 74/15 | 14/01625-1 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2015 | 48/15 | 14/01625-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 245/15 | 14/01625-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrispurningur er komin til TK/KB frá IRF, um at ganga saman um at finna loysnir til viðgerð og burturbeining av rottangaevju. IRF skrivar, at tey eru í ferð við at leita eftir og kanna meiri haldgóðum loysnum til viðgerð og burturbeining av rottangaevju, enn tær ið nýttar verða í dag, og heitir á TK/KB um at vera við at kanna, um tað fíggjarliga og í aðrar mátar loysir seg best at byggja og reka eitt ella fleiri anlegg og at kjølfesta loysnirnar í felag ella hvørt felag sær, og hvar slíkar loysnir mest høgliga kunnu leggjast. IRF hevur leysliga kanna onkra alternativa viðgerðarskipan.
Víst verður til skriv frá IRF, j.nr. 14/0625-5.

Stjórin í IRF, Poul Andrias Joensen, er til reiðar at koma á fund í teknisku nevnd, at greiða nærri frá fyrispurninginum.

Sum støðan er í løtuni, er átroðkandi at fáa ein loysn á spurninginum um nýtt rottangapláss, í staðin fyri verandi rottangapláss í Húsahaga.
Nýtt rottangapláss, ið byggir á somu viðgerð av evjuni við kálkstabilisering, men við goymslutangum, er nærum liðugt projekterað, men eingin loysn er í eygsjón viðvíkjandi staðsetingini.

Umboð fyri KB og formansskapurin í teknisku nevnd, hava á arbeiðsferð í DK saman við IRF verið og hugt eftir tilíkum annleggi, sum IRF vísir á, og verið á óformligum kunningarfundi við umboð fyri Krüger, ið hevur bygt annleggið.

At síggja til tykist hendan tøknin rættiliga áhugaverd og vælegnað til føroysk viðurskifti. Eyðsýndir fyrimunir eru í, at skipanin er lokað og luktur er nærum eingin. Sambært teimum upplýsingum, ið eru fingnir til vega higartil, er kostnaðurin á einum rættiliga rímiligum støði, helst lægri enn tann loysnin við goymslutangum, sum arbeitt hevur verið við higartil.

Áðrenn umsitingin kann arbeiða áfram at kanna møguleikarnar fyri eini slíkari loysn saman við IRF, er neyðugt at fáa heimild og fígging til tess. Í fyrsta umfari má heimild og fígging fáast til at gera skitsuprojekt saman við IRF, sum skal vera grundarlagið undir eini støðutakan til, um eitt tilíkt annlegg skal byggjast. Kannast og lýsast skal m.a.:

1. Hvat ið “endaliga produktið” er og kann vera, og hvussu sleppast kann av við hetta
2. Hvørjar teknisku loysnir eru bestar til at koma fram til ”endaliga produktið”

3. Hvørjir eru møguleikarnir og hvørjar eru treytirnar fyri at viðgera og "sleppa av við" tí frásoldaða tilfarinum, við vætufrárensl, við eftirverandi evjuna (endaliga "produktið") ella við ósku frá møguligari brenning av evjuni.
4. hvørt tað loysir seg best fíggjarliga og rakstrarliga fyri partarnar at byggja eitt felags annlegg, ella um partur av annlegginum skal vera felags og aðrir partar hvør sær, ella um talan skal vera um hvør sítt annlegg.
5. Tekniskar/rakstrarligar treytir fyri staðseting av annleggi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

- At umsitingin fær heimild at gera skitsuprojekt og kanningar annars, til tess at lýsa grundarlagið undir eini tilíkari loysn.
- At játtaðar verða 426.000 kr. av framfluttari løgujáttan á konto 7175-L71001til kanningar og projektering.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti (februar 2015):**

Tórshavnar kommuna hevur fingið eina framløgu av einum skitsuprojekti, sum IRF hevur gjørt av umrøddu skipan (framløgan hevur j.nr. 14/01625-13). Umsitingin hjá TK hevur ikki beinleiðis verið við at gera skitsuætlanina, tí IRF fór í gongd við arbeiðið beinanvegin, áðrenn umsitingin hjá TK hevði fingið heimildina til projektering uppá pláss, men IRF hevur kunnað umsitingina hjá TK um arbeiðið so hvørt.

Umsitingin hevur, við støði í fyriliggjandi skitsuprojekti og erfaringstølum annars, gjørt metingar av hvat ið kostnaðurin fyri TK kann væntast at verða at viðgera rottangaevjuna, um talan gerst um eitthvørt samstarv við IRF um eina slíka skipan, sí talvu 1 niðanfyri. Fyrivarni verður tikið fyri, at íløgu- og rakstrarkostnaðurin bert eru mettur útfrá fyriliggjandi tilfari.

**Talva 1: Yvirlit yvir íløgur og rakstur**

| | Íløga<br>Mió kr. | Avskriv-ingartíð (ár) | Kapitalkostn. íløga (við 4 % p.a.)<br>Mió kr. pr. ár |
|---|---|---|---|
| **Íløga pr annlegg:** | | | |
| -Bygningur | 20 | 20 | 1,47 |
| -Maskinur | 15 | 15 | 1,35 |
| **Íløga í alt** | **35** | | **2,82** |
| | | | |

| **Rakstur** | | | |
|---|---|---|---|
| -Annlegg (felags): | | | 1,73 |
| -Flutningur av evju úr TK til Hagaleiti og aftur (Bert TK) | | | 0,48 |

Um talan gerst um eitthvørt samstarv, koma partarnir at deilast um kostnaðin til íløguna og rakstur av annlegginum eftir einhvørjum lutfalli, sum samráðast skal um.

**Samstarvshættir**
Samstarvið kann skipast á ymiskan hátt, t.d.:

I. Annar parturin fremur íløguna og rekur annleggið, meðan hin parturin viðger evjuna á annlegginum (sum keyp av tænastu). Um IRF fremur íløguna og stendur fyri rakstrinum, meðan TK bindur seg til at viðgera sína evju á annlegginum (sum keyp av tænastu), skal TK ikki sjálvt gera íløgu í nýtt rottangapláss. Eftir hesum modellinum verður økti rakstrarkostnaðurin hjá TK umleið 2,1 til 2,5 mió. um árið. Hetta er helst einklasti hátturin at skipa samstarvið uppá, og kann skipast í sáttmála yvir 10-20 ár.

II. Báðir partar fremja íløguna, meðan annar parturin rekur annleggið. Báðir partar binda seg til at viðgera evjuna á annlegginum. Um IRF stendur fyri rakstrinum, og TK bindur seg til at viðgera sína evju á annlegginum (sum keyp av tænastu), verður neyðugt hjá TK við eini íløgu á umleið 17,5 mió. og øktum rakstrarútreiðslum á umleið 1-1,2 mió. um árið. Samstarvið verður eitt sindur truplari at skipað enn I, av tí at talan gerst um felags ognarskap av einum annleggi, og má tí skipast í langtíðarsáttmála.

III. Báðir partar standa fyri íløguni og reka annleggið í felag, og báðir partar binda seg til at viðgera evjuna á annlegginum. Hesin hátturin gerst helst torførari at fremja enn I og II, av tí at talan gerst bæði um felags ognarskap og rakstur av annlegginum (herundir starvsfólk), og skal samstarvið tí skipast í langtíðarsáttmála

IV. Báðir partar stovna eitt nýtt interkommunalt felag ella eitt partafelag, sum stendur fyri íløguni og at reka annleggið. Báðir partar binda seg til at viðgera evjuna á annlegginum. Hesin háttur kann gerast kostnaðarmiklari, tí eitt nýtt felag viðførir eyka útreiðslur til m.a. umsiting.

**Uppskot til loysnir**
Í talvu 2 eru ymsu uppskotini til loysnir settar upp yvirskipað. Viðmerkingar til ymsu loysnirnar eru undir talvuni.

**Talva 2: Yvirlit yvir uppskot loysnir í mun til verandi skipan**

| | Samstarv við IRF | TK loysnir (ikki samstarv við IRF) | | |
|---|---|---|---|---|
| Loysn | **A**<br>IRF-uppskot | **B**<br>IRF-uppskot | **C**<br>Rottangapláss/ Móttøkutangar | **D**<br>Verandi loysn |
| Staðseting: | Leirvík/Hagaleiti | Tórshavn (á Hjalla) | ?? | Húsahagi |
| Íløga (Mió kr.) | 0 (I)<br>17,5 (II) | 35 | 15 | - |
| Øking í rakstrarútr. mió pr.ár | 2,1 - 2,5 (I)<br>1,0 - 1,2 (II) | 1,0 | 0,5 | - |

| Viðgerðarháttur | Polymer/skrúvupressa Bandpressa Turking við hita | Polymer/skrúvupressa Bandpressa Turking við hita | Kálk Turking við vanligum luftskifti | Kálk |
|---|---|---|---|---|
| Viðgerð av Endaprodukt: | Brenning / jørðáskot | Brenning / jørðáskot | Jørðáskot | Jørðáskot |

**Viðv.: A**

Loysn A er uppskotið, sum IRF hevur arbeitt við, og sum IRF ætlar at byggja og staðseta niðanfyri Brennistøðina á Hagaleiti í Leirvík. Romartalið í parantes sipar til fyrr umrødda samstarvsshátt.

Á Hagaleiti kann tøk avlopsorka frá Brennistøðini gagnnýtast til turking av evjuni. Hetta uppskotið er væl meiri framkomin enn loysn C, sum er nýtt rottangapláss, sum TK áður partvíst hevur projekterað. IRF-uppskotið er í høvuðsheitum ein skipan, har evjan fyrst verður turkað í eini skrúvupressu, og síðani turkað enn meira við einum bandturkara, har ið avlopshiti frá Brennistøðini verður nýttur. At enda verður lidna produktið latið í sekkir. Fyrimunir við hesi skipan eru serliga, at skipanin er lokað og harvið meiri arbeiðsumhvørvis-vinarlig, og at evjan verður turkað so mikið nógv, at til ber at brenna hana og harvið kann evjan burturbeinast endaliga á ein tryggan hátt.

**Viðv.: B**

Loysnin er sama tekniska loysn sum A, men framd av og staðsett í Tórshavnar kommunu. Loysnin krevur nógva hitaorku og einastu hugsandi hitakeldur eru Brennistøðin á Hjalla ella olja, sum er dýr og dálkandi ($CO_2$ útlát). Avlopsorkan frá Brennistøðini er tó í sáttmála latin til Fjarihitafelagið (FHF), sum brúkar stóran part av orkuni, serliga um veturin, og tískil er ikki nóg mikið av orku tøk til hesa loysn í verandi støðu. Væntandi fer orkutørvurin hjá FHF at økjast komandi árini. Skal orka fáast frá Brennistøðini, má sáttmálin við FHF broytast fyrst, so at orkan kann nýtast til hetta endamálið, men so kann orka koma at mangla í til Fjarhitaskipanina.

Skal orkan frá Brennistøðini nýtast, má annleggið staðsetast beint við síðuna av Brennistøðini, t.v.s. á einum av ídnaðarøkjunum yvirav Brennistøðini, sum eru privat ogn. Hesar ognir mugu tískil keypast ella ognartakast frá eigarunum.

**Viðv.: C**

Loysn C er ein víðarimenning av verandi rottangaskipan, sum í dag verður nýtt í Húsahaga. Evjan verður eins í Húsahaga viðgjørd/stabiliserað við kálki, men í mun til verandi skipan, har ið kálkviðgjørda evjan liggur undir opnum himli, verður kálkviðgjørda evjan flutt í goymslutangar at turka.

Hendan loysnin krevur, at hóskandi byggilendi verður funnið. Krøvini til lendi eru m.a. hesi:

- Vídd: umleið 80 m * 80 m = 6400 $m^2$, helst rímiliga slætt
- Er flokkað í umhvørvisflokk 7 og skal tí liggja minst 500 m frá bústaðarøki. Helst verður eisini neyðugt við hóskandi frástøðu frá øðrum virksemi, har ið fólk arbeiðs ella savnast.
- Økið skal liggja í kloakkeraðum øki, har ið kloakkin verður leidd á streymasjógv.
- Økið skal hava vegatgongd til tunga ferðslu
- Økið skal ikki liggja ov høgt, vegna vanda fyri kava og hálku.

Um IRF byggir eina loysn sum A, so er tað rættiliga ivasamt, um tað verður gjørligt hjá TK at fremja og nýta loysn C, vísandi til, at loysn A er væl meiri framkomin tekniskt, arbeiðs-umhvørvisliga og umhvørvisliga, og harumframt loysir trupulleikan við endaliga produktinum

betri. Krøv frá myndugleikum (umhvørvismyndugleikum og arbeiðseftirliti) um at nýta best tøku tøkni (BAT), umframt møguligur mótvilji frá starvsfólki at arbeiða við eini verri skipan enn tann hjá IRF, kann forða fyri, at loysnin kann fremjast.

**Viðv.: D**

Loysn D er verandi skipan á rottangaplássinum í Húsahaga. Sum áður er víst á, er loysnin ikki hóskandi ella brúkilig longur (mál 14/00625). Trupulleikarnir eru serliga hesir:

- Ivasamt eru, hvussu effektiv hygiejniseringin við kálkviðgerðini er, tá ið evjan liggur undir opnum himli og kálkið regnar burtur aftur eftir fáum døgum
- at evjan fæst ikki nóg turr, so hon kann útleggjast sum jørðáskot.
- Ógjørligt at leggja evjuna í hóskandi atskildar goymslur og harvið halda evjuna atskilda eftir aldri, so hon kann leggjast út aftur eftir túri
- Arbeiðsumhvørvi er ikki nóg gott (tungar byrður, vandi at fáa esjandi kálk á seg, sera óhumskar umstøður, ið kunnu sleppast undan við aðrari tøkni

Ein onnur týðandi orsøk til at onnur loysn, enn verandi loysn við rottangaplássi í Húsahaga, má finnast, er at verður rottangaplássið flutt, so kann plássið nýtast til tyrvingarøkið, sum er harðliga tiltrongt.

**Kostnaður pr. borgara**

Í Talvu 3 niðanfyri er núverandi og framtíðar kostnaðurin at reka tangatømingarøkið vístur í krónum fyri hvønn borgara, um farið verður undir samtarv við IRF um nevndu loysn.

Undir verandi kostnað er ikki roknað við gjørdum íløgum í føst annlegg (rottangapláss, kálkblandari, bygningar/garagur, vaskipláss), men gjørdar íløgur í rottangabilar og slamsúgvara eru við.

**Talva 3: Kostnaður av tangatømingarskipan (kr. pr. borgara pr. ár)**

| Verandi kostnaður | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | miðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 200 | 164 | 217 | 197 | 195 | |
| Íløgur í bilar | 51 | 51 | 51 | 51 | 51 | |
| Bruttoútreiðslur í alt | 251 | 215 | 268 | 248 | 246 | |
| Inntøkur | -34 | -30 | -32 | -33 | -32 | |
| Nettokostnaður | 216 | 185 | 236 | 215 | **213** | |
| | | | | | | |
| **Framtíðar kostnaður** | | | | | Samstarvsháttur I | Samstarvs háttur II |
| Nýggj útr. viðgerð (samst.háttur I / II) | | | | | 125 | 60 |
| **Kostnaður í alt** | | | | | **338** | **273** |

**Samanumtikið:**

Vísandi til:

- At neyðug hitaorka ikki er tøk til loysn B og at øki á Hjalla ikki er tøkt.
- At útlit eru fyri, at IRF byggir eina meiri framkomna loysn A, sum ger tað torført at verja loysn C
- At loysn D ikki er hóskandi ella brúkilig longur og at bráðfeingis tørvur er á plássinum í Húsahaga til tyrving.

Metir umsitingin, at skilabesta loysnin í verandi støðu er at fara í samstarv við IRF um loysn A.

Umsitingin hjá IRF ætlar at leggja málið fyri politisku leiðsluna hjá IRF (nevnd/aðalfund) í vár til politiska støðutakan. Í hesum sambandi er tað er umráðandi hjá IRF at vita, um Tórshavnar kommuna verður partur av ætlanini, soleiðis at annleggið kann fyrireikast til nøgdirnar hjá Tórshavnar kommunu eisini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:
1. at Tórshavnar kommuna tekur prinsipiella avgerð um at samstarva við IRF um loysn A (samstarv við IRF um IRF-uppskot á Hagaleiti).
2. at arbeitt verður víðari við at skipa sjálvt samstarvið við IRF sambært uppskot I (IRF stendur fyri íløgu og rakstri), alternativt sambært uppskot II (at báðir partar fremja íløguna, meðan IRF stendur fyri rakstrinum). Herundir eisini at gera uppskot til eina fyribils samstarvsavtalu um tilgongdina fram til at endaligur samstarvssáttmáli kann gerast.
3. at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina, og at støðutakanin hjá TK verður fráboðað IRF.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvis-nevndini og fíggjarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í mai 2015 saman við IRF verið á kunningarferð í Sveits/Týsklandi og hugt eftir tveimum annleggum, sum turka rottangaevju við tí tøkni, sum ætlanin er at nýta í annlegginum hjá IRF.

Umsitingin hevur somuleiðis verið á fundi við IRF tann 8. september 2015, har ið IRF kunnaði um gongdina í málinum. IRF upplýsti, at
- IRF prinsippielt tekur undir við tí samstarvshátti, sum Tórshavnar býráð samstykti 23. apríl 2015 (at IRF stendur fyri íløgu og rakstri, og at TK keypir kapasitet til viðgerð av síni evju)
- Arbeitt verður við at útvega lendi til annleggið
- IRF hevur heitt á Rambøll um at vera byggiharraráðgevi, herundir at gjøgnumganga projektuppskotini frá Krüger/Haarslev, seta upp neyvar kravfestingar, gera útbjóðingartilfar og innheinta tilboð uppá eina samlaða loysn
- IRF hevur heitt á Jógvan Páll Lassen, advokat hjá IRF, um at orða uppskot til eina fyribils samstarvsavtalu / «Letter of intent», sum væntandi verður klárt ein av fyrstu døgunum.

Eitt uppskot til fyribils samstarvsavtalu er móttikið tann 16/9-2015 og verður lagt fram fyri nevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við ætlanar-avtaluni j.nr. 14/01625-25 og at beina málið í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 200/15 Kloakk við Hoyvík/Hoydalar (2013-0563)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 100/15 | 14/02031-19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 256/15 | 14/02031-19 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 200/15 | 14/02031-19 |

**Málslýsing:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá kommununi, er ætlanin at fara undir gera arbeiðið liðugt at samla kloakkirnar í Hoydølum. Talan er um at skipa kloakkleiðing úr Hoyvík, herundir partar í 'Gamla býarpartinum' í Hoyvík og leiða tær út á streymasjógv.

Arbeiðið fer at fevna um at savna kloakkirnar frá Garðavegnum, Gamlaveg og 'Gomlu Hoyvíkini' og leiða kloakkina í verandi útleiðing á Boðanesi.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2.500.000,- og er ynski um at fáa heimild at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftaná. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í vár.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og er ætlanin at nýta 2,5 mió. kr. til dagføring av útleiðingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 2.500.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin 24. mai 2013, kl. 11.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, j. nr. 2013-0563/7.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 20136-0563/8, verður samlaði fíggjartørvurin fyri prosjektinum kr. 2.033.959,-. (við 6,25% MVG) Býráðið hevur hin 21. mars 2013 játtað kr. 2.500.000,- til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 2.033.959,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 (Kloakkir) L68015 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0563.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Kloakk við Hoyvík/Hoydalar, L68015, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 242.658,-

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

## 201/15 Kloakk á Signabø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 103/15 | 15/03637-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 257/15 | 15/03637-1 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 201/15 | 15/03637-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 10/15 | 15/03637-1 |

**Málslýsing:**
Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at samla kloakkirnar á Signabø. Talan er um at savna verandi kloakk frárensl á Signabø í skipaða leiðing, sum verður leidd út á streymasjógv. Í løtuni verður stórur partur av spillivatni leitt út í á, sum munnar út í fjøruna.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 0,35 mió. og er ynski um at fáa heimild at fáa Martin E. Leo at gera útbjóðingartilfar klárt, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,35 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av útleiðingunum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 15/03637-3 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,35 mió. (við 6,25% MVG).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 0,35 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Umboð frá teknisku deild greiddi frá málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 350.000 av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015. konto 6875 (kloakkir) og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

# 202/15 Dagføring av kloakk í Líðunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 104/15 | 15/03745-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 258/15 | 15/03745-1 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 202/15 | 15/03745-1 |

**Málslýsing:**
Framhaldandi tilgongdini av spillivatnsætlanini hjá TK er komið fram til at neyðugt er at dagføra høvuðskloakkirnar í Líðunum. Kloakkin er úr betong og óvist er nær hon er løgd.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 0,35 mió. og er ynski um at fáa heimild at fáa ráðgeva at gera útbjóðingartilfar klárt, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,35 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av kloakkum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 15/03745-2 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,35 mió. (við 6,25% MVG).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 0,35 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 350.000 av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015. konto 6875 (kloakkir) og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

## 203/15 Dagføring av kloakk við Tjarnarlág

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 105/15 | 15/03746-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 259/15 | 15/03746-1 |
| 3 Býráðsfundir | 29.10.2015 | 203/15 | 15/03746-1 |

**Málslýsing:**
Framhaldandi tilgongdini av spillivatnsætlanini hjá TK er komið fram til at neyðugt er at dagføra høvuðskloakkina. Kloakkin er úr betong og óvist er nær hon er løgd.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 0,35 mió. og er ynski um at fáa heimild at fáa ráðgeva at gera útbjóðingartilfar klárt at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,35 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av kloakkum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 15/03746-2 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,35 mió. (við 6,25% MVG).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 0,35 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 350.000 av konto 6875 (kloakkir) og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 22:15</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrun Amalia Mohr | |